# Pedagogbladið

FØROYA PEDAGOG FELAG

01
15



## Sosialpedagogikkur í 2014



## Árligi aðalfundurin

verður á Hotel Føroyum
5. apríl

# Úr innihaldinum


| | |
|---|---|
| Oddagrein | 2 |
| Tíðindi frá felagnum | 4 |
| Aðalfundur | 6 |
| Frágreiðing frá nevndini | 9 |
| Reggio Emillia í Aalborg | 13 |
| Okkara Reggio Emilia | 14 |
| Fólk við menningartarni og sjónleikur | 15 |
| Samstarv millum lesandi | 17 |
| Kunning frá felagnum | 18 |
| Politikararnir virða sáttmálaøkið lítið | 21 |
| 48 tíma fráboðanarfreist til verkfall | 20 |
| Lønartalvur | 21 |
| Fjøltáttaðar uppgávur | 25 |
| Føroya Pedagogfelag hevur fingið dagførda pensjónsloysn í LÍV | 27 |
| Fyrireikingartíð | 32 |
| Blaðsnikkari alt lívið | 34 |
| Norðurlond vísa vegin | 36 |
| Sosialpedagogikkur í 2014 | 38 |


# KOLOFON


**ÚTGEVARI:**
Føroya Pedagogfelag
Tlf. 357576 – Fax 357573
pedagog@pedagogfelag.fo – www. pedagogfelag.fo
**LAGT TIL RÆTTIS:** Sp/f Rit & Ráð
Tel. 229242 – www. ritrad.fo
**UMBRÓTINGING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ:**
Føroyaprent – www.foroyaprent.fo
**ÁBYRGDARBLAÐSTJÓRI:** Maud Wang Hansen
maud@pedagogfelag.fo
**BLAÐIÐ VERÐUR PRENTAÐ** í 2.500 eintøkum, kemur út eina ferð um ári, og verður sent limunum í Føroya Pedagogfelag ókeypis
**ONNUR ÁHUGAÐI** kunnu gerast haldarar við at seta seg í samband við felagið.


**LOYVT ER** at endurgeva tilfar úr blaðnum (*myndir undantiknar*) treytað av, at keldan verður upplýst.


**FORSÍÐUMYNDIR:** Anna Sofía Egilstrøð *(ovara myndin)*
Jógvan Olsen *(niðara myndin)*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705


# ODDAGREIN



Maud Wang Hansen

## Góðu limir

Grækarismessan er farin afturum, og tjøldrini venda aftur til okkara stormbarda land at finna sær føði. Við sínum eyðkenda ljóði gleða tey hvørt eyga, sum sær tey, og hvørt oyra, sum hoyrir. Tey birta vónina um, at várið brátt er aftur í hondum. Alt melur í klingur, árstíðirnar endurtaka seg, høgtíðirnar endurtaka seg – og eisini aðalfundurin endurtekur seg á hvørjum ári. Hesa ferð hittast vit á Hotel Føroyum tann 5. apríl.

Í hesum Pedagogblaðnum er dentur lagdur á sosialpedagogikk. Eitt heiti, sum nógv ikki kenna týdningin av, og tó eitt heiti, ið ber so ómetaliga nógv í sær, sum torført er at seta orð á. Tað er júst hetta, vit fara at gera, at seta orð á sosialpedagogikkin. Á evnisdegi tann 28. mars fær Pedagogfelagið vitjan bæði av umboðum úr SL í Danmark og úr FO í Noregi. Henda vitjan er beinleiðis sprottin úr samstarvinum millum sosialpedagogar í Norðurlondum. Undirritaða var í 2012 saman við nevndu sosialpedagogum við til at skriva uppritið um ST-barnarættindasáttmálan, sum eisini verður viðgjørt á evnisdegnum. Tveir limir, sum starvast á sosialpedagogiska økinum, eru við í virkseminum at varpa ljós á sosialpedagogiska arbeiðið, og komandi tíðina vera ymisk tiltøk á breddanum.

Sosialpedagogikkur er í dag ein inkluderaður partur av øllum pedagogiskum arbeiði. Bæði á dagstovnum, í fólkaskúlanum, á økinum „børn og ung" hjá Almannaverkinum og á økinum „vaksin við menningartarni".

**At gera hol í sjógv – endamálið við sosialpedagogiskum arbeiði, ið krevur eina professionella tilgongd**

*Fyrimyndin fyri sosialpedagogiskum arbeiði er vanliga samfelagið, endamálið er at skapa ein vælvirkandi, meiningsfullan og virðiligan gerandisdag fyri einstaklingin og felagsskapin. Í sær sjálvum ljóðar hetta einfalt, men er í veruleikanum ein professionell uppgáva, ið krevur stóra menniskjaliga og fakliga kompetansu, tí talan er um viðurskifti millum professionel og menniskju, ið liva undir serstøkum samfelagskarmum, oftani á stovni, og sum hava serstakan tørv og atferð, soleiðis, at gerandisdagurin ofta als ikki er nøkur sjálvfylgja. Afturat hesum koma so uppgávur í mun til at samskifta við avvarðandi og samfelagið annars.*

Sitat, Rógvi Thomsen úr námsfrøðiligu vangamyndini um sosialpedagogikk.

Tað er mín vón, at bæði politiski myndugleikin, útbúgvingarøkið og arbeiðsgevarar fara at geva hesum evni stóran ans, og at limir okkara í framtíðini fáa bestu umstøður at útbúgva seg og arbeiða undir, bæði tey, sum starvast hjá kommunum og tey, sum starvast hjá landinum. Tað er eisini mín vón, at politiski myndugleikin fer í arbeiðsklæðini og undir at gera lóggávu, sum tryggjar øllum borgarum í landinum, sum tørvar pedagogiska hjálp og stuðul, bestu umstøður úr vøggu í grøv at liva og mennast í.

Sum fakfelag vilja vit vera virkin partur í at vísa veg, og við okkara vitan um, hvat rørir seg í londunum rundan um okkum og ikki minst heima í Føroyum vilja vit vísa á møguleikar heldur enn forðingar. Vit eru eitt fakfelag, sum er ríkt at vitan, og henda vitan, sum liggur hjá hvørjum einstøkum limi okkara, er eitt tilfeingi, sum hevur ómetaliga stórt virði. Tað er hesum virði, sum arbeiðsgevarar, foreldur, børn, ung og vaksin bæði á alment pedagogiska og á sosialpedagogiska økinum dagliga fáa ágóðan av, og tað er hetta, sum ger Føroyar til eitt gott land at liva í.

Tykkum verður ynskt eitt blítt vár og vælkomin á aðalfund.

*Maud Wang Hansen*
*Forkvinna*




BANKNORDIK

# 2 pensjónir eru ikki líka

## Endiliga ein pensjón, sum er persónlig.

Ert tú líka sum grannin? Ella starvsfelagin? Sjálvandi ert tú ikki tað. Og tí skalt tú heldur ikki hava somu pensjón sum nakar annar. NordikPensjón er einasta pensjón, sum verður samansett júst til tín og til tín tørv.

**Vælkomin til NordikPensjón**
**www.banknordik.fo/pensjon**

NordikPENSJÓN

*Alt, sum tín pensjón eigur at vera*

- 0 krónur til umsiting við Nordik360+ og Nordik360Premium
- Fult yvirlit við Netbankanum
- Lagað til tín og tín tørv
- Góðir tryggingarmøguleikar
- Enn betri heildarráðgeving
- Møguleiki fyri enn betri avkasti

SENDISTOVAN

## NEVND



**Maud Wang Hansen**
*Námsfrøðingur*
Forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Elin N.W. Tausen**
*Námsfrøðingur*
Næstforkvinna
elin@pedagogfelag.fo



**Bjarni Beder**
*Námsfrøðingur*
Skrivari
elin@pedagogfelag.fo



**Irdi Lið Gaardlykke**
*Hjálparfólk*
Nevndarlimur
jannie@pedagogfelag.fo



**Marjun Petersen**
*Námsfrøðingur*
Nenvdarlimur
wenzel@pedagogfelag.fo

## UMSITING



**Maud Wang Hansen**
*Námsfrøðingur*
Forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo



**Anna Dalsgarð**
Bókhaldari
anna@pedagogfelag.fo

*Pedagogfelagið á leiðararáðsfundi í 2014 legði endaligu reglugerðina fyri leiðararáðið fram, sum Leiðararáðið og nevndin vóru samd um.*

# Reglugerð fyri **leiðararáðið** í Føroya Pedagogfelag

### § 1 Limir leiðararáðsins, val og valbæri.

Í Føroya Pedagogfelag verður skipað leiðaráð sambært ásetingunum í hesari reglugerð.

Leiðararáðið í Føroya Pedagogfelag telur 5 limir.

Fyri at kunna gerast limir í leiðararáðnum skal viðkomandi persónur vera limur í Føroya Pedagogfelag og starvast sum leiðari innan sáttmálaøki felagsins.

### § 2

Leiðararáðið verður valt á fundi, sum hildin verður á hvørjum ári eftir regluliga ársaðalfundin í Føroya Pedagogfelag. Leiðararáðið skipar fyri fundinum.

Allir leiðarar, eindarleiðarar og varaeindarleiðarar, sum eru limur í Føroya Pedagogfelag og starvast innan sáttmálaøki felagsins kunnu møta á fundinum. Leiðarar, eindarleiðarar og varaeindarleiðarar eru valbærir og hava atkvøðurætt. Nevndarlimirnir í Føroya Pedagogfelag hava eisini rætt at møta á fundinum.

Limirnir verða valdir fyri tvey ár í senn og kunnu afturveljast.

Limir í leiðararáðnum verða valdir umboðandi dagstovnaøkið og serøkið, minst ein fyri hvørt øki.

Hvørt ár verða trýggir tiltakslimir valdir fyri eitt ár í senn, minst ein fyri hvørt øki.

Leiðararáðið skipar seg við formanni, næstformanni og skrivara.

### § 3 Endamál og heimildir leiðararáðsins.

Endamálið hjá leiðararáðnum eru at røkja fakligu áhugamálini hjá leiðarunum.

Leiðararáðið hevur m.a. heimild at kunna um rættindi og skyldur, kunna um leiðslu og námsfrøði og á annan hátt, alt innan karmarnar av fíggjarjáttanini, hesi reglugerð, avgerðum frá nevndini og lógum felagsins.

Leiðararáðið hevur heimild at samskifta við felagið vegna leiðararnar og at umsita játtanina sum nevnd er í grein 6.

### § 4 Leiðararáðið – nevndin.

Leiðararáðið skal verða ráðgevandi fyri nevndina í viðurskiftum, sum hava við sáttmálaviðurskifti og starvsviðurskifti leiðaranna at gera.

Nevndin og leiðararáðið skipa fyri minst fýra fundum árliga, at samskifta um spurningar, sum hava felags áhuga. Nevndin kallar inn og ger skrá sambært ynskjum frá nevnd og leiðararáð.

### § 5 Leiðararáðið – umsiting felagsins.

Eftir tørvi kann nevndin avgera, at leiðararáðið fær hjálp frá umsiting felagsins til ítøkjulig mál.

Eisini kann nevndin gera almennar leiðsreglur fyri í hvønn mun ráðið kann leita sær hjálp hjá umsitingini.

### § 6 Fíggjarligu karmar leiðararáðsins.

Nevndin í Føroya Pedagogfelag ásetur á hvørjum ári fíggjarkarmin fyri virksemið hjá leiðararáðnum.

Nevndin kann innan fíggjarkarmarnar játta fígging til samsýning fyri fundir, ítøkjulig mál og almemt til virksemi ráðsins.

Treytin fyri fíggjarligari játtan er, at leiðararáðið í seinasta lagi 1.desember á hvørjum ári sendir nevndini eina fíggjar- og virksemisætlan til góðkenningar. Hvørt ár skal ráðið lata nevndini uppgerð yvir hvat játtanin ítøkjuliga er brúkt til.

### § 7 Samtykt og broyting av reglugerðini.

Hendan reglugerð er samtykt av nevndini í Føroya Pedagogfelag tann 28. Apríl 2014.

Nevndin í Føroya Pedagogfelag hevur heimild at broyta og taka av hesa reglugerð, men áðrenn nøkur broyting/avtøka verður framd, skal leiðararáðið hava høvi at koma við sínum viðmerkingum.

## Páskafrí

Telefonavgreiðslan er stongd frá mánadegnum 30. mars til týsdagin 7. apríl.
Átrokandi boð kunnu sendast á pedagog@pedagogfelag.fo

***Vit ynskja øllum limum einar gleðiligar páskir.***




## Innliman og broyting av upplýsingum

Fyri rætta skráseting av limum felagsins hevur tað stóran týdning, at limir senda felagnum innlimingarskjal ella broytingarskjal. Broytingarnar hava týdning, fyri at limir eru skrásettir rætt. Hetta ger samskiftið millum limin og umsitingina smidligari og skjótari.

### Minnist til!

- Álitisfólkið minnir nýggj starvsfólk á at fylla út innlimingarskjal, tá tey byrja í starvi.-
- At senda broytingarskjal, um limur skiftir starv, eftirnavn, bústað, telefonnummar ella teldupostadressu.
- Til ber at fylla út innlimingarskjal ella broytingarskjal á heimasíðuni www.pedagogfelag.fo ella við at senda teldupost á pedagog@pedagogfelag.fo.

## Gjald til eftirløn frá 1. januar 2015

Flestum kunnugt varð nýggj eftirlønarlóg sett í gildi í Føroyum frá 1. januar 2014 at rokna. Nógvar ásetingar eru í lógini, men fyri flestu limirnar í Føroya Pedagogfelag broytir lógin einki – í øllum førum ikki tey næstu árini. Ert tú námsfrøðingur í føstum starvi, ella hjálparfólk í føstum starvi og hevur verið í føstum starvi í meira enn 1 ár, rindar arbeiðsgevarin tína eftirløn.

### Tó eru nøkur atlit at taka um:

1. tú ikki ert í føstum starvi
2. tú ert hjálparfólk, men hevur starvast í minni enn í ár
3. tú arbeiðir minni enn 15 tímar um vikuna

Hoyrir tú undir ein av hesum trimum bólkunum krevur nýggja lógin, at í minsta lagi 2% av tíni løn, verður rindað í eftirløn og hetta eftirlønargjald verður tá drigið frá tínari løn.

Tað eru tó undantøk soleiðis, at ávísir limir sleppa undan at rinda eftirløn. Undantøkini eru galdandi, um:

- Tú ert yngri enn 21 ár
- Tú hevur nátt fólkapensjónsaldur, fødd/ur áðrenn 1.1.1954
- Eftirlønargjaldið, í samband við eina lønarútgjalding, er minni enn kr 30 kr.

Herumframt kann søkjsat um undantak, um tú er flutt/-ur til Føroyar og er tí tíðaravmarkaðum starvi í styttri tíðarskeið enn 5 ár.

## Setanarskriv – tímalønt – eftirløn

Felagið vil við hesum minna allar limir á, at tit innan 14 dagar eftir starvsetan skulu hava setanarskriv tykkara. Arbeiðsgevarin skal senda felagnum avrit av øllum setanarskrivum í seinasta lagi 14 dagar eftir starvssetan. Avleiðingarnar av, at felagið ikki fær avrit av setanarskrivum, eru m.a., at limir kunnu koma illa fyri í møguligum uppsagnarmálum og viðvikjandi próvbyrðu í sambandi við rættin til eftirløn, hetta serliga hjá tímaløntum limum.

### Sambært sáttmálanum eru tímalønt tey, sum:

a) í miðal arbeiða minni enn 15 tímar um vikuna ella
b) ikki vera sett í fast starv, men sum avloysarar undir frítíð, sjúku ella líknandi ella til annað fyribils arbeiði, **sum varir minni enn tríggjar mánaðir**.

Tímalønt starvsfólk eiga 4% afturat lønini sum samsýning fyri serstakar frí- og halgidagar.

Starvsfólk, ið starvast í miðal meiri enn 15 tímar um vikuna í eitt tíðarskeið á tríggjar mánaðir, hava rætt til eftirløn, ávikavist 10 % fyri hjálparfólk (fyrsta árið undantikið), 12 % fyri pedagogar á dagstovnum og 14% fyri pedagogar á landsins stovnum.

## Samlagstrygging

Nevndin í Pedagogfelagnum hevur tikið avgerð um aftur í 2015 at rinda tær 125,- kr í samlagstrygging fyri teir limir felagsins, sum eru at meta sum virknir limir. T.e. limir sum eru í føstum starvi meira enn 15 tímar um vikuna, og sum rinda eitt limagjald hægri enn 122,50 kr. Limir, sum eru í óløntum farloyvi ella av øðrum orsøkum ikki eru í starvi, og harvið ikki rinda limagjald, kunnu venda sær til felagið um sínar møguleikar fyri at vera partur av samlagstryggingini.

# Tóku undir við semingsuppskoti

*Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið skrivaðu seinnapartin undir eina avtalu um flokking av námsfrøðingum og hjálparfólkum, sum eru stuðlar í fólkaskúlanum, námsfrøðingum, sum arbeiða í serstovum í skúlunum, og námsfrøðingunum, sum arbeiða á Skúlanum á Trøðni.*

Tá semjan varð undirskrivað 15. januar í ár, vóru nøkur flokkingarmál eftir at fáa upp á pláss. Tá ikki varð komið á mál við hesum samráðingum, sendu vit boð eftir semingsmonnunum, og teir komu uppí. Nakrir fundir hava verið millum partarnar saman við semingsmonnunum, og í dag fingu partarnir eitt semingsuppskot handað frá Terja Sigurðsson, semingsmanni. Seinnapartin kl.15.00 boðaðu báðir partar frá, at teir tóku undir við semingsuppskotinum, og avtalan um nýggju flokkingarnar varð undirskrivað.

– Semjan lýsir ikki tað úrslitið, sum nevndin í Pedagogfelagnum strembaði eftur, tí hon betrar bert umstøðurnar hjá nøkrum av okkara limum. Semjan er eitt stig á leiðini fyri betri lønar- og setanarviðurskiftum hjá limum okkara í fólkaskúlanum, sigur Maud Wang Hansen.

Avtalan snúi seg um trý arbeiðsumráði hjá námsfrøðingum. Nýggj flokking er gjørd fyri námsfrøðingar, sum arbeiða á serstovum í skúlum, og við nýggju flokkingunum hækkar lønin hjá teimum. Eisini er nú staðfest, at fyrireiking v.m. verður roknað sum partur av arbeiðstíðini hjá námsfrøðingum á serstovum. Hjá námsfrøðingunum á Skúlanum á Trøðni var staðfest í avtaluni, at verandi arbeiðstíð er galdandi, og lønin hækkar samsvarandi lønini hjá námsfrøðingum á serstovunum. Við í samráðingunum vóru eisini lønar- og arbeiðsviðurskiftini hjá stuðlunum, bæði hjá námsfrøðingum og hjálparfólkum í skúlunum. Men tað eydnaðist ikki broyta lønina hjá teimum hesa ferð.

– Tað harmar meg almikið, at vit ikki fingu lyft hendan bólkin á hesum sinni, men eg fegnist um tey stig, sum vit hava tikið, og at tað er nú er staðfest, at arbeiðsumstøðurnar hjá øllum okkara limum í fólkaskúlanum skulu skipast betur, sigur Maud Wang Hansen.

# Semingsuppskot

**Ímillum Fíggjarmálaráðið**
**og**
**Føroya Pedagogfelag**

Vísandi til punkt 5 í semjuni millum øðrumegin Føroya Pedagogfelag og hinumegin Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, frá 15. Januar 2014, verður gjørd henda semja um ávísar flokkingar:

**LØN**

Í § 3 í sáttmálanum sum fór úr gildi 01.10.2013 verða gjørdar hesar broytingar:

Galdandi frá 1. Januar 2015, verður gjørdur nýggjur bólkur:

## G. Størv í Fólkaskúlanum

### 1. Námsfrøðingar knýttir at serstovnum í fólkaskúlanum.

Verður lønt á lønarstigunum 13, 15, 17, 19, 21

Leiðsla skúlans ger av hvussu nógv tið skal til fyrireiking, uppfylging og annað, sum part av arbeiðstíðini smb. § 9 í sáttmálanum.

### 2. Námsfrøðiligir stuðlar í skúlum

Verða lønt á lønarstigunum 11-19

### 3. Hjálparfólk sum stuðlar

Verða lønt á lønarstigunum 3-8, men tey sum eru á stig 6-9 eiga at halda áfram

### 4. Námsfrøðingar á skúlanum á Trøðni

Verða lønt á lønarstigunum 13, 15, 17, 19, 21

Verandi lokala siðvenja, fyri hvussu arbeiðstíðin hjá pedagogum á skúlanum á Trøðni eru skipað heldur fram, t.e. eftir § 2 í avtaluni millum Føroya Lærarafelag og Fíggjármálaráðið frá 26. Apríl 2001.

*Tórshavn 18. Desember 2014*

**Føroya Pedagogfelag** **Fíggjarmálaráðið**

# Gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð frá 1. oktober 2014

| Frá klokkan | Til klokkan | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag | Leygardag | Sunnudag |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 0 | -1 | 31,05 + 35,29 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 |
| 1 | -2 | 31,05 + 35,29 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 |
| 2 | -3 | 31,05 + 35,29 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 |
| 3 | -4 | 31,05 + 35,29 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 |
| 4 | -5 | 31,05 + 35,29 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 |
| 5 | -6 | 31,05 + 35,29 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 |
| 6 | -7 | | | | | | 35,29 | |
| 7 | -8 | | | | | | 35,29 | |
| 8 | -9 | | | | | | 35,29 | |
| 9 | -10 | | | | | | 35,29 | |
| 10 | -11 | | | | | | 35,29 | |
| 11 | -12 | | | | | | 35,29 | |
| 12 | -13 | | | | | | 35,29 | |
| 13 | -14 | | | | | | 35,29 | |
| 14 | -15 | | | | | | 35,29 | |
| 15 | -16 | | | | | | 35,29 | |
| 16 | -17 | | | | | | 35,29 | |
| 17 | -18 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41+35,29 | 25,41 |
| 18 | -19 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41+35,29 | 25,41 |
| 19 | -20 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41+35,29 | 25,41 |
| 20 | -21 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41+35,29 | 25,41 |
| 21 | -22 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41+35,29 | 25,41 |
| 22 | -23 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41 | 25,41+35,29 | 25,41 |
| 23 | -24 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05 | 31,05+35,29 | 31,05 |
| | | | | | | | | |
| | Umlagdir tímar: | | 23,25 | | | | | |
| | Varningsgjald: | | 25,77 | | | | | |
| | Undirvísingargjøld: | | 215,28 | 418,27 | 341,39 | 1.048,39 | 440,10 | |




# ANNA GEVST SUM BÓKHALDARI

*Eftir 14 ár gevst Anna Dalsgarð í summar sum bókhaldari á Pedagogfelagnum.*

Tá hon byrjaði, var arbeiðstíðin 20 tímar um vikuna, og arbeiðið var at hava bókhaldið umframt annað fyrifallandi arbeiði. Sum árini gingu, vaks limatalið nógv, og nú er tað meira enn tvífalt tað, sum var, tá hon byrjaði, og arbeiðið við bókhaldi hareftir, so arbeiðstíðin øktist við árunum.

– At arbeiða við bókhaldi er rættiliga strævið arbeiði og kann mangan tykjast einsligt, men mær hevur dámt væl. Her í húsinum hendir altíð nakað, nevndin skiftir manning, og tí eru tey ikki so fá fólk, sum eg eru komin at starvast saman við, sigur Anna.

Bókhaldsarbeiðið er í dag munandi øðrvísi, enn tá hon byrjaði heilt ung á Trygd. Tá vóru ongar teldur, men stórar roknskaparbøkur. Hóast vit siga, at bókhald er bókhald, uttan mun til hvørji amboðini og hentleikarnir eru, so er munandi lættari í dag, og nú er eisini nógv lagaligari at fáa ein meira útgreinaðan roknskap, sigur Anna.

Hóast Anna nú gevst í dagliga starvi sínum á Pedagogfelagnum, setur hon seg ikki hendur í favn. Tað sigur hon seg als ikki hava tíð til. Hon hevur mong frítíðaráhugamál, m.a. ger hon nógv við ymisk handarbeiði, og so eru tað familjan, ikki minst ommubørnini, og hundurin.

– Nú fái eg veruliga stundir at taka mær meira av løttum, og tað gleði eg meg til, sigur Anna.

Tórshavn 17.2.2015



# Tað vóru sorgarboð at fáa at Kári á Rógvi ikki er millum okkum longur

Sólin sløknaði og tað bleiv myrkt, tá eg fekk boðini, at Kári var deyður. Hóast kunnug við sjúkralegu hansara, so vóru vónirnar um, at hann aftur kom fyri seg og tók upp sín álitissess sum formaður í nevndini í Fasta Gerðarrætti enn ljóslivandi.

Sum nevndarumboð fyri fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum í Fasta Gerðarrætti havi eg haft eitt tætt og gott samskifti og samstarv við Kára, sum fyrimyndarliga røkti formansstarv sítt. Kári hevur verið formaður frá tí, at Fasti Gerðarrættur varð settur á stovn og til nú. Sáttmálin um Fasta Gerðarrætt kom í gildi 1. apríl 2006, og var fyrsta málið lagt fyri Fasta Gerðarrætt 30. august 2006, og fyrsti úrskurður var sagdur 30. januar 2007.

Kári hevur haft sera stóran týdning fyri føroyskan arbeiðsrætt. Kári var fortalari fyri, at einstaki løntakarin sjálvur skuldi royna síni mál í geðarrættinum. Hann helt í minni mun, at løgfrøðingar skulu føra málini, tí tá hava tey lyndi at flyta seg ov langt burtur frá gerandisdegnum í arbeiðslívinum. Fasti Gerðarrættur var settur á stovn til tess at skapa eina føroyska skipan, har partarnir á arbeiðsmarknaðinum í einum óformellum rættarumhvørvi kundu loysa arbeiðsmarknaðartrætur og seinni eisini tulkingarósemjur.

Kári gekk ógvuliga høgt upp í leiklutin sum nevndarformaður, og var hann høvuðsfyriskipari av árligu almennu arbeiðsmarknaðardøgunum og skeiðum í arbeiðsmarknaðarrætti fyri pørtunum. Hesi skeið vóru ætlað at styrkja um fatanina av arbeiðsmarknaðinumog teim skipanum, sum hava týdning fyri ein vælreguleraðan arbeiðsmarknað. Kári var ein sera góður undirvísari og var altíð stuttligur og áhugverdur at lurta eftir. Fyri Kára var gerandisdagurin týdningarmiklari fyri frálæruna enn tungi lógarteksturin.

Kári undirvísti á Fróðskaparsetrinum, har fleiri umboð fyri fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum hava luttikið á hansara skeiðum um kollektivan arbeiðsrætt og fyristingarlóg. Kári skrivaði bøkur um evnið og gav tí stirvna lógarmálinum nýggjan ham og eitt serføroyskt snið. Hann var altráður at deila sína vitan við onnur og kom fegin inn á gólvið at umrøða ymiskar støður og at ráðgeva um ivamál.

Í einari av bókum Kára er ein tekning av einum dinosauri, sum sonur hansara hevur teknað. Kári fortaldi stoltur um sonin, sum helt, at ein dinosaurur sjálvandi átti at vera við í bókini hjá pápanum.

Við Kára blivu arbeiðsrættur og fyristing áhugaverd fyri fleiri, og hansara lætta og stuttliga sinni gjørdi, at sjálvt tann tunga løgfrøðin varð minni torskild fyri vanlig fólk.

Ein oddviti í føroyskum arbeiðsrætti er sløknaður. Saknurin er ómetaliga stórur, og plássið kemur at standa tómt. Eg eri sera takksom fyri at hava kent Kára.

Við djúpastu samkenslu við Jóhonnu og børnunum.

**Maud Wang Hansen**
Nevndarlimur í Fasta Gerðarrætti




*Nevndin hevur valt at skipa sítt arbeiði við at býta tað sundur í ábyrgdarøki, sum hvør nevndarlimur so hevur ábyrgdin av at taka sær av. Tað merkir, at nevndarlimirnir hava hvør síni ábyrgdarøki í mun til førleika, tørv og áhuga. Ábyrgdarpersónar leggja fram nýtt um sítt ábyrgdarøki á nevdarfundum, og er hetta fast punkt á fundarskránni.*

Ábyrgdarpersónur skal fylgja við í, hvat fer fram á økinum og møguliga skipa fyri fundum ella tiltøkum og skriva greinar um síni ábyrgdarøki og tað sum hendir har.

Sum forkvinna havi eg høvuðsábyrgdina av øllum arbeiðinum í felagnum, men eg havi eisini nøkur orðað ábyrgdarøki, sum eru føst á fundarskránni til nevndarfundirnar.



*Ábyrgdarøki: Maud Wang Hansen*

## Norðurlendskt samstarv

Í norðurlendska samstarvinum er forkvinnan partur av stýrinum í NFFS (Nordisk Forum For Socialpædagoger) og NLS (Nordisk Lærarorganisationers Samråd). Tveir stýrisfundir eru um árið, á vári og á vetri. Á NFFS-fundunum eru tað sosialnámsfrøðiliga arbeiðið og námsfrøðiútbúgvingin, sum verða viðgjørd í løtuni. Nógv verður gjørt við at varpa ljós á viðurskifti hjá sosialnámsfrøðini í Norðurlondum, bæði viðvíkjandi arbeiðinum við børnum, ungum, fólki við menningartarni og marginaliseraðir bólkar, m.a. flóttafólk, heimleys og sálarsjúk. Í løtuni fer eitt arbeiði fram, har pedagogútbúgvingarnar í Norðurlondum verða samanbornar, og greinað verður, hvussu stórur partur av sosialnámsfrøði er í útbúgvingini.

Á NLS-fundunum eru bæði námsfrøðingar og lærarar. Hetta er eitt ógvuliga stórt forum, og tað er lærarayrkið, sum er dominerandi her, men hetta er eisini forum fyri dagstovnaøkið, og har hava vit eina rødd millum meira enn 600.000 onnur fakfólk í Norðurlondum. Serliga nógva umrøðu fáa nýggju arbeiðstíðarreglurnar í fólkaskúlanum í Danmark, Pisa-kanningin og førleikakrøv hjá lærarum og námsfrøðingum.

Felags fyri báðar felagsskapirnar eru samfelagsligu og politisku umstøðurnar í londunum og tær avgerðir, sum verða tiknar, og hvussu tær ávirka møguleikarnar at útinna fakið.

## Skeið

Tað er mín ábyrgd at syrgja fyri, at skipað verður fyri skeiðum fyri álitisfólk, leiðarar og allar limir. Vit hava í fjør haft skeið fyri øll tey nýggju álitisfólkini og fyri leiðararnar í felagnum. Vit hava skipað fyri øðrum skeiðum, men seinast vit skipaðu fyri einum skeiði um „Torføru samrøðuna“, var ov lítil undirtøka. Limir eru altíð vælkomnir at koma við hugskotum um skeið, sum felagið átti at skipa fyri.

## Álitisfólk

Álitisfólkini eru sera týdningarmikil partur av fakfelagsarbeiðinum, og tí er umráðandi, at tey eru klár til uppgávuna. Umframt at skipa fyri skeiðum fara vit í komandi tíð at tosa nærri við øll álitisfólk um, hvat tey meta skal til, fyri at tey kenna seg ílatin til uppgávuna. Á heimasíðuni hava vit gjørt eitt intranet til øll álitisfólk, og har verður kunnað um tað, sum viðvíkur álitisfólkaarbeiðinum.

## Leiðararáðið

Seinastu árini hava vit haft nógvar fundir um, hvørt leiðarar uppliva at vera partur av felagnum ella ikki. Leiðararáðið hevur skipað fyri fundum um hetta, og kjakast hevur verið um, hvørt leiðarar yvirhøvur ynsktu at vera limir í Pedagogfelagnum. Niðurstøðan var, at leiðarar eru partur av felagnum, og í fjør komu leiðararáðið og nevndin so ásamt um eina reglugerð, sum ásetur heimildirnar hjá leiðararáðnum.

## Heimasíðan

Tað er forkvinnan, sum hevur ábyrgd av heimasíðuni. Nevndin tók avgerð um at brúka pening upp á at gera nýggja heima-

síðu og at laga hana til tørvin, sum limir felagsins hava á kunning og tíðindum. Fyri at hava ein hampiliga javnan tíðindaflutning hava vit gjørt avtalu við Press um at gera tilfar til heimasíðuna. Tíðin er komin til at dagføra heimasíðuna, og sum nakað nýtt kunnu vit gleða limir okkara við, at tað nú verður møguleiki at geva hvørjum øðrum lut í fakligari vitan á heimasíðuni. Tá ið vitanardepilin verður klárur, merkir tað, at limir kunnu lata onnur fáa høvi at lesa sínar bacheloruppgávur á heimasíðu okkara. Afturfyri verður latin ein upphædd fyri hvørja uppgávu. Eisini er ein Bloggur um at vera klárur at leggja fyri dagin; her kunnu limir skriva sínar upplivingar og tankar um sítt arbeiði og um viðurskifti, sum mett eru at hava áhuga hjá øðrum limum eisini.

## Keyp av LÍV

Seinastu tvey árini hevur ein tilgongd verið í samband við, at fakfeløg ætla at keypa lívstryggingar- og pensjónsfelagið LÍV. Hetta er ein ógvuliga kompleks tilgongd, og nógv er at taka atlit til, áðrenn ein umsókn verður latin Tryggingareftirlitinum. Beint nú verður serliga arbeitt við at tryggja viðurskiftini, sum hava landt skassaveðhald, og krevst ávíst lógararbeiði til hetta. Vónandi verður tað ikki so leingi, til vit vita meira ítøkiligt um hetta keypið.

## Samráðingar/flokkingar

Samráðingar eru ein tann størsti og mest krevjandi parturin av fakfelagsarbeiðinum hjá bæði forkvinnu og nevnd. Seinastu tíðina hava flokkingarmál eisini tikið nógva tíð. Beint undan jólum gjørdu vit semju um stuðlar og námsfrøðingar í fólkaskúlanum og um námsfrøðingarnar á skúlanum á Trøðni. Kunningarfundur hevur eisini verið um hesa semju. Sáttmálarnir ganga út 1. oktober í 2015, so eftir aðalfundin verður aftur brett upp um armar, og farið verður undir at fyrireika komandi samráðingar. Vónandi verða nýggju sáttmálarnir, sum eru galdandi frá 1.10. 2013 til 1.10.2015, undirskrivaðir ein av nærmastu døgunum.



*Ábyrgdarøki: Bjarni Beder*

## Gott samband við tey lesandi

Pedagogfelagið hevur við jøvnum millumbilum samskifti við avvarðandi myndugleikar, har ymiskar ætlanir verða lagdar um, hvussu felagið kann hava best møguligt samband við tey, sum nema sær útbúgving á námsfrøðiliga økinum. Í tí sambandi arbeiðir felagið fyri einum tiltaki á námsvísindadeildini, sum verður undan aðalfundinum, har øll námsfrøðilesandi verða boðin við til eitt tiltak við fakligum innihaldi, har møguleiki eisini verður at kunna skjótt útbúnu námsfrøðingarnar um ymisk felagsviðurskifti. Harafturat fáa tey í felagsnevndini eisini innlit í, hvat rørist millum tey lesandi, og tað hevur ikki minni týdning, heldur Bjarni Beder, skrivari felagsins. Sama er við teimum, sum júst eru byrjað lesnaðin, og sum felagið eisini vil hava gott samband við frá fyrsta degi. Tí skipaði felagið herfyri eisini fyri serligum tiltaki fyri teimum fyrstaárslesandi, har tey m.a. vórðu kunnað um, hvat felagið kann bjóða teimum.

Bjarni sigur, at torførari er at fáa samband við tey netlesandi. Teirra lesnaður er knýttur at fleiri ymiskum lærustovnum, og hann vil tí fegin, at tey, sum fara undir fjarlestur, boða felagnum frá, so samband eisini fæst við tey.

## Vilja keypa uppgávuna

Nevndin í Pedagogfelagnum samtykti herfyri, at felagið vil bjóða sær til at keypa B. Ed.-uppgávuna frá teimum lesandi, soleiðis at felagið kann almannakunngera innihaldið. Endamálið við tí er at fáa til vega enn eitt fakligt ískoyti til heimasíðuna og harafturat fáa fakliga boðskapin út í almenna rúmið – til gagns fyri øll námsfrøðiáhugað.

## Lestrarbólkur fyri lesandi

Føroya Pedagogfelag hevur sett á stovn ein limabólk fyri námsfrøðilesandi, har endamálið er at skapa eitt netverk fyri tey lesandi, og somuleiðis samstarv millum tey og fakfelagið. Í lestrarbólkinum eru fimm lesandi, og verður hesin bólkur valdur á hvørjum ári.

Í fjør heyst varð skipað fyri einum kafétiltaki í matarhøllini á námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya. Á skránni var áhugaverd frágreiðing frá Tanju Simonsen, ið er námsfrøðilesandi á 4. ári. Eisini hugleiddi Niels Juel Arge, ið fekk B. Ed.-prógv í juni 2013, um arbeiði aftan á skúlan, og harumframt vísti hann á aðrar spennandi møguleikar, ið arbeiði sum námsfrøðingur kann stuðla undir.

Umboð fyri limabólkin greiddu frá sínum virksemi, og Bjarni Beder greiddi stutt frá møguleikunum hjá námsfrøðilesandi, ið eru limir í Føroya Pedagogfelag, at søkja um stuðul úr A&U grunninum.

Á fundinum varð eisini gjørt av at velja trý fólk afturat í lestrarbólkin, soleiðis at hann gjørdist fullmannaður. Í bólkinum eru nú: Alma á Lava, Hildur Kruse Sørensen, Arna Silvurstein, Sigrun Ørvarodd og Sára Henriksen.



*Ábyrgdarøki: Elin N. W. Tausen*

### A&U-grunnurin vil fegin stuðla verkætlanum

Aktións- og Upplýsingargrunnurin hjá Pedagogfelagnum er væl fyri peningaliga, so limir skulu ikki at halda seg aftur at søkja um stuðul, hava teir ætlanir um at fara undir okkurt átak til frama fyri at breiða út kunnleika, fatan ella gransking á pedagogiska økinum, sigur Elin N. W. Tausen, næstforkvinna í Pedagogfelagnum.

Elin greiðir frá, at A&U-grunnurin, sum hann í stytting verður nevndur, er byrjaði verkfalskassin hjá felagnum. Broytingar í reglugerðini í 2012 gera, at ein størri partur av innistandandi peningi kann verða latin til at stuðla átøkum til frama fyri pedagogiska arbeiðið. Næstforkvinnan sigur, at áhugin at søkja stuðul úr grunninum hevur verið rættiliga misjavnur ár um ár, og vil hon tí staðiliga minna limirnar á hendan møguleika. Nevndin fyri grunnin viðger møguligar umsóknir fýra ferðir um árið.

Stuðul verður ikki latin í sambandi við persónligar útbúgvingar, men er talan um eina serliga verkætlan í sambandi við útbúgvingina, kann stuðul verða latin, um nevndin heldur verkætlanina verða viðkomandi og til gagns fyri fleiri.

Seinasta tiltakið, sum nevndin fyri A&U-grunnin hevur skipað fyri, er Fakfagnaðurin „Námsfrøði í verki“, og var eitt mál at fáa kostnaðin fyri at luttaka so lagaligan sum gjørligt.

Allar upplýsingar um, hvussu søkjast kann um stuðul, eru at finna á heimasíðu felagsins undir „A&U-grunnurin“.

### Námsfrøðingar í fólkaskúlanum

Pedagogfelagið gjørdi stutt fyri jól eina semju við Fíggjarmálaráðið um ávísar flokkingar av stuðulsstørvum í fólkaskúlanum og námsfrøðingum á Skúlanum á Trøðni. Elin N. W. Tausen, næstforkvinna í Pedagogfelagnum, fegnast um, at tey nú loksins hava fingið eina áseting í sáttmálan, sum snýr seg um námsfrøðingar í fólkaskúlanum. Ein tílík áseting hevur ikki verið áður. Hetta er eitt stig á leiðini, at námsfrøðingar fáa betur skipað viðurskifti í sambandi við leiklut teirra í fólkaskúlahøpi, sigur næstforkvinnan.



*Ábyrgdarøki: Marjun Petersen*

# Pedagogar á serstovnaøkið

*Tað er ikki nóg mikið, at tað bert liggur í kortunum, at tað eru pedagogar, sum eiga høvuðsleiklutin á serstovnaøkinum. Tað eigur eisini at verða staðfest í einari lóg, sigur Marjun Elttør Petersen, sum hevur havt Almannaverk, sosiallóggávu, normeringar og álitisfólk á serøkinum sum ábyrgdarøki hesar mánaðirnar, hon hevur verið í nevndini.*

– Tað er fáur, sum ivast í leiklutinum hjá einum lækna, sjúkrarøktarfrøðingi, fysioterapeuti ella ergoterapeuti. Mong starvsheiti kundu verið nevnd afturat, har tað er sjúka ella viðgerð, sum fokus er á. Har er tað øðrvísi við pedagoginum, sum sjálvur er „amboðið“. Tí er altavgerandi, hvørja menniskjafatan og hvørji virði ein hevur, hvørji ástøði, heimspeki og hættir tann einstaki velur at stuðla seg til og arbeiða út frá. Hetta omanfyri nevnda er tað, sum myndar mítt pedagogiska arbeiði. Tað at vera tilvitað um, hví eg geri, sum eg geri; at eg kann grundgeva sum pedagogur, hví eg geri, sum eg geri. Eg havi mangan undrast á, hvussu tilvildarligt arbeiðið á serøkinum hevur verið – tó í bestu meining, men í pedagogfakligum arbeiði má faklært fólk vera. Her má vera manglandi vitan, sum ger, at boðin verða pedagogisk tilboð, har tað ikki samstundis er eitt krav, at pedagogar skulu vera á økinum. Tað hongur ikki saman, sigur Marjun Petersen.

Ein orsøk til, at politikararnir ikki í nóg stóran mun seta krøv til innihaldið í arbeiðinum, eitt nú á serstovnaøkinum, serskúlum og aðrastaðni, heldur Marjun ivaleyst vera tørvandi fakligan kunnleika, og tað skilur hon væl, tí heldur ikki politikarar kunnu vera fakfólk á øllum økjum. Tí bað nevndin herfyri um fund við Anniku Olsen, landsstýriskvinnu við almannamálum, har høvi var at greiða landsstýriskvinnuni frá okkara sjónarmiðum.

Gamaní verður eitt nú á serstovnaøkinum søkt eftir námsfrøðingum innan AMR, MMR og kommunurnar.

Vit síggja ferð eftir ferð lýsingar eftir námsfrøðingum og fólki at hava ábyrgd av tí námsfrøðiliga arbeiðinum, og tað er gott og heldur ongin trupulleiki í tí; tað eru námsfrøðingarnir útbúnir til. Tað hevði verið skilagott, at munur hevði verið gjørdur á, um uppgávurnar eru pedagogiskar, ella talan er um praktiskar uppgávur. Tó skal sigast, at ein pedagogur eisini ger nógvar praktiskar uppgávur, uppgávan blívur ikki pedagogisk, fyrr enn eg taki borgaran við upp í uppgávuna, – eg plagi at siga, at tað *er munur á einum reinførisbað og einum pedagogiskum bað* – ella *at gera mat, sum er ein praktisk uppgáva , um borgarin ikki er við.* – Okkara fakfelag hevur fleiri ferðir víst á, at tað eru pedagogarnir, sum hava serkunnleika á sosialpedagogiska økinum. Har er lítið og einki av krøvum til innihaldið í arbeiðinum, og tí verður arbeitt ov tilvildarliga. Tó skal sigast, at tað nógvastaðni eru dugnalig fólk, sum gera eitt megnararbeiði.

### Vit mangla sosiallóggávu og tænastulóg

Striltið hevur gingist at fáa eina sosiallóggávu, ið hevði givið betur skipað og kvalifiserað viðurskifti á serstovnaøkinum. Nógv orka er løgd í at vísa á tørvin á einari sosiallóggávu. Hetta var eisini eitt evni á fundinum við landsstýriskvinnuna við almannamálum, har tosað varð um tørv og ynski vegna teir borgarar, vit arbeiða fyri, og okkara limir í felagnum, sum arbeiða

á serøkinum, á eldrasambýlum og øðrum stovnum, heimum og skúlum. Henda fund høvdu vit í novembur mánaði. Sum skiltist, so fór tað ikki at verða leingi, til at farið skuldi verða til verka viðv. sosiallógávuni. Okkurt var farið í gongd, og tað verður spennandi, tá ið vit fara at vera boðin við í arbeiðið við nýggjari sosiallóggávu. Landsstýriskvinnan vildi fegin hoyra okkara sjónarmið, og tað haldi eg eisini, at politikarar yvirhøvur eru áhugaðir í, sigur Marjun Petersen.

Vit hava júst nú sæð eitt tilmæli viðvíkjandi tilboð um víðari skúlagongd til ung millum 18 og 25 ár verða handað, og tað er at gleðast um. Her er eitt skúlatilboð, sum orðið sigur tað, men tað er eisini hugsað sum eitt heildartilboð, har næmingar hava tørv á sosialpedagogiskum stuðli fyri at fáa gerandisdagin og lívið at hanga saman.

At arbeiða sum sosialpedagogur tekur, uttan mun til, hvørjum vit arbeiða við, altíð støði í at stuðla hesum menniskjum til at kunna liva eitt lív við størst møguligum lívskvaliteti, – væl at merkja lívskvaliteti eftir teirra indiviudella málistokki.

– Vit mangla sum sagt í stóran mun at fáa lógarfest, hvat skal vera av innihaldi í teimum ymisku tilboðunum. Vit áttu at havt líknandi skipan, sum tey hava í Danmark, eina tænastulóg. Tað sigur Marjun Petersen, nevndarlimur í Pedagogfelagnum, ið hevur drúgvar starvsroyndir innan Almannaverkið, sum hon heldur virkar ov tilvildarliga, tá vit tosað um innihaldið í teimum ymisku bútilboðum; her eru tó batar gjørdir. Her áttu vit fyri langari tíð síðan at havt fingið staðfest, hvat bútilboðini áttu at bjóðað. Tað eru nógvir batar at hóma á skrift, men hvussu verður alt hetta sett í verk? Hetta kann bert gerast betur. Evstu ábyrgdina, at so er, eigur politiski myndugleikin, sum eisini hevur ábyrgd av eftirlitinum, sigur hon.

– Hægsti myndugleikin er tann politiski, sum játtar pengarnar, og sum vit vita, kostar tað eitt sindur meira, um ynskiligt er at hava fakfólk.



*Ábyrgdarøki: Irdi Lið Gaardlykke*
Irdi hevur eisini síni ábyrgdarøki, m.a. sálarligt arbeiðsumhvørvi, sum verður viðgjørt í aðrari grein í blaðnum

# Ung **uttan** trygdarnet

*Hóast Føroyar ofta verða lýstar sum eitt satt paradís at vaksa upp í, so er tað ein sannroynd, at alt ov nógv ung eisini her detta niðurímillum. Vit hava ov fáar skipanir at lofta teimum ungu, sum av einihvørjari orsøk eru í vandabólki, sigur Maud Wang Hansen, forkvinna í Pedagogfelagnum.*

*Ingolf S. Olsen – PRESS*

Ofta verður sagt, at eitt samfelag skal metast eftir, hvussu tað fer við sínum veikastu borgarum, men eftir hesum mátistokki hava Føroyar sum heild onki at reypa av, heldur Maud Wang Hansen, forkvinna í Føroya Pedagogfelag.

Tí hóast okkara lítla, ríka land eigur at hava bestu fortreytir at vera góður gróðrarbotnur hjá teimum ungu, so er tað ein sannroynd, at alt ov nógv teirra kortini detta niðurímillum.

„Vit hava alt ov fáar skipanir í okkara samfelag at lofta ungum, sum av einihvørjari orsøk koma í ein vandabólk. Hetta ger, at vit oftast ikki vita um tey, fyrr enn tey eru komin so illa fyri, at tey beinleiðis eru til vanda fyri seg ella onnur – ella bæði – til dømis við misnýtslu og harðskapi," sigur Maud Wang Hansen.

## Varskógvan

Hon situr í stýrinum fyri NFFS (Nordisk Forum For Socialpædagoger), sum í november 2014 kom við einari yvirlýsing um ung, sum detta niðurímillum. Talan er um ein trupulleika, ið øll Norðurlondini hava, tó at tey ofta verða mett at vera heimsins tryggastu og best skipaðu vælferðarsamfeløg, og yvirlýsingin er ein varskógvan og áheitan á politikararnar um at gera okkurt við henda álvarsama trupulleikan.

Í teimum størru Norðurlondunum sæst samanhang millum arbeiðsloysi og ung í vandabólki – arbeiðsloysi gongur í arv, og ringi sosiali arvurin, ið ofta stendst av arbeiðsloysi, gongur eisini í arv.

Í Føroyum hava vit ikki nógv skrásett arbeiðsloysi, og vit kenna lítið og onki til júst hetta samanhangið.

„Tá vit hava so fáar skipanir at lofta teimum ungu, vita vit eisini alt ov lítið um, hvørji tey eru, tí vit síggja tey ikki, fyrr enn tey ikki longur bara eru í vandabólki, men teirra lív og levnaður er vorðið sera trupult", sigur forkvinnan í Pedagogfelagnum.

## Paradís við lýtum

Nógvum føroyingum dámar annars væl at lýsa Føroyar sum paradísið á jørð hjá børnum at vaksa upp í.

„Tað kann tað eisini vera, og fotreytirnar fyri tí eru eisini absolutt til staðar, men við bara at ganga og billa okkum inn, at alt er so idylliskt og ljósareytt, gloyma vit at halda eyga við vandateknunum millum tey ungu og at taka hond um tey," staðfestir Maud Wang Hansen.

„Seinnu tíðina hevur nokk so nógv fokus verið á fátækadømi í Føroyum, og hvørjar trupulleikar tað kann elva til, so har vita vit eitt sindur, men vita ikki nógv um lívið hjá børnum hjá eitt nú arbeiðsleysum – tí vit hava eisini arbeiðsleys í Føroyum – og øðrum sosialt útsettum foreldrum, sum sjálv hava tað trupult."

Tað, sum skal til, er, at politikararnir taka ábyrgd og brúka neyðugu orkuna at taka hond um trupulleikan – vit hava fakfólkini, sum skulu til," sigur hon.

Av tiltøkum, sum kunnu hjálpa ungum á leiðini, kann nevnast TÍTT-royndarverkætlanin hjá SSP, Tiltøk í Tøkum Tíma. Arbeiðið í ungdómshúsunum kring landið er sera týdningarmikið, og tað er gott, at ungdómar hava eitt tilhaldsstað, har námsfrøðingar eru til arbeiðis, sum hava stundir at lurta og bara vera har og eisini seta tiltøk í verk, sum geva teim ungu sjálvsálit og eina góða kenslu av at vera ung í Føroyum.

*Frá NFFS stýrisfundi, oktober 2014*

# Ung á markinum millum at klára seg og at detta burturímillum

Eitt samfelag, sum megnar at fevna um allar sínar borgarar, er eitt samfelag, sum virkar væl. Hvussu gott samfelagið er ber til at máta við at hyggja, hvussu tað fer við teimum, sum hava truplast við at klára seg. Í einum samfelag, har nógv detta burturímillum og verða forfjónað, vaksa teir sosialu trupulleikarnir í stórum. Hetta hevur neiligar avleiðingar bæði menniskjaliga og samfelagsliga. Ójavnar á sosialt-heilsuliga økinum vísa seg bæði at standast av og at elva til, at ójavnar á sosialt-fíggjarliga økinum verða varðveittir.

Norðurlendsku vælferðarsamfeløgini hava altíð lagt stóran dent á møguleikar hjá ungdómi at nema sær útbúgving og at fáa arbeiði. Vælferðarskipanirnar hava eisini serliga miðað eftir at lofta ungum, sum eru í vanda fyri at detta burturímillum og liva í útjaðaranum á samfelagnum, soleiðis at tey skulu kunna klára seg, gerast før fyri at røkja eitt arbeiði og kenna, at tey hoyra við til samfelagið. Kortini eru tað nógv ung í Norðurlondum, sum av ymsum orsøkum detta burturímillum, og hjá nógvum ungum ber tað í sær, at tey fáa ilt við at fóta sær í vaksnamannalívinum.

Torberg Falch, professari í búskapi við NTNU í Tróndheimi, hevur víst á, at fyri hvørt ungt fólk, sum dettur burturímillum, svarar missurin í virðisskapan í lívsskeiðinum til 7,1 milliónir krónur. Harafturat koma avleiðingar av vandanum fyri øktum kriminaliteti, rúsmisnýtslu og lágari lívsgóðsku. Verður hetta íroknað, er einki at ivast í, at samfelagsbúskaparligi kostnaðurin er enn størri. Í Danmark hevur *Arbejderbevægelsens Erhvervsråd* (AE) nýliga gjørt eina kanning, sum vísir, at sosialir trupulleikar ganga í arv í størri mun nú enn fyri tíggju árum síðan. Krøvini til útbúgving eru herd, og talið á størvum í ídnaðinum eru minkað. Av teimum 17 ára gomlu, sum í 1994 búðu hjá langtíðararbeiðsleysum foreldrum, vóru 31% sjálv vorðin arbeiðsleys í 2012. Samsvarandi talið var í 2003 einans 23%, sambært frágreiðingini *Klassekamp fra oven*. Hetta er í størstan mun galdandi fyri tilflytarar úr londum uttan fyri vesturheimin.

Munur er á, hvønn dent teir ymsu politisku flokkarnir í Norðurlondum leggja á málini hjá vælferðarsamfelagnum at minka um sosialar ójavnar. Samstundis liva vit í einum altjóðagjørdum heimi, har marknaðarkreftir og onnur viðurskifti eru ein stór avbjóðing til norðurlendsku vælferðarsamfeløgini. Tí hava vit hesi seinastu mongu árini sæð avleiðingar av, at sosialpolitikkurin verður individualiseraður, soleiðis at bæði tiltøk og ábyrgd verða vend til tann einstaka. Nógv minni dentur verður lagdur á, hvussu felagsskapir og samfelagsligir stovnar skulu loysa tær sosialu avbjóðingarnar, og nógv minni dentur verður lagdur á at broyta tær skipanir og bygnaðir, sum halda fólkum føstum í torførum lívsstøðum úti á eggini á samfelagnum.

At samfelagið ger eitt miðvíst arbeiði á sosialpolitiska økinum og somuleiðis viðvíkjandi uppvakstrarkorum hevur alstóran týdning, bæði fyri samfelagið sum heild og fyri tann einstaka. Eitt slíkt miðvíst arbeiði hevur stórt virði og ger mun bæði menniskjaliga og búskaparliga. Tað er av týdningi at meta um, hvørji tiltøk virka. Í tiltøkum, sum verða sett í verk til tess at tryggja møguleikarnar hjá og virðingina fyri tí einstaka menniskjanum og til tess at minka um ójavna í samfelagnum, hevur tað alstóran týdning at viðgera bæði rættindini hjá einstaklinginum og tann yvirskipaða bygnaðin.





Umframt, at sosial tiltøk verða sett í verk at stuðla ungum, sum eru dottin burturímillum ella eru í vanda fyri tí, krevjast eisini politisk avrik. Tørvur er á sosialum samfelagsligum átøkum, har dentur verður lagdur á viðurskifti, sum eru við til at skapa eitt samfelag, ið fevnir um allar sínar borgarar og ikki útihýsir summum. Munagóð avrik skulu til, um tað skal eydnast øllum samfelagsins borgarum, uttan mun til sosiala støðu og lívsstøðu, at taka lut í samfelagnum. At tey gerast virkin, bæði sum samfelagsborgarar í politiskum høpi og í sínum egna nærumhvørvi og lívi. Umframt at styrkja um skipanir og fakfólk, sum á ymsan hátt hava við ung í útjaðaranum á samfelagnum at gera, er tørvur á meiri gransking. Gransking av, hvørji tiltøk virka fyribyrgjandi, hvørji sosial átøk virka, og hvussu dentur á sosialpedagogiskar førleikar til dømis í barnagarði, fólkaskúla og miðnámi kann elva til úrslit.

Sosialpedagogisk átøk bera í sær, at menniskju verð sædd í tí samanheingi, tey liva, og arbeiðið tekur støði í hesum. Tað sosialpedagogiska arbeiðið miðar eftir viðurskiftum á sosialum og umhvørvisligum økjum. Týdningarmesti parturin av sosialpedagogiska førleikanum er at byggja upp sínámillum sambond og at arbeiða við og út frá teimum førleikum og royndum, sum fólk sjálv hava. Granskingin vísir, at júst tað at skapa sínámillum sambond hevur avgerandi týdning fyri, at broytingar- og menningararbeiði skal eydnast. Tað hevur nógv at siga, at ungfólk uppliva at verða sædd og hoyrd av einum, sum tey kenna seg trygg saman við. Útlit teirra at mennast og finna seg til rættis og síggja sínar møguleikar batna í stórum. Uttan mun til, hvørjum høpi ella tiltøkum ung fólk í vandabólkum eru lutur av, so ræður um at leggja soleiðis til rættis, at tey vaksnu rundan um tey hava neyðugu førleikarnar at skapa tryggleika, og at tey somu vaksnu eru har í longri tíð.

Ung fólk, sum fremja brotsverk ella eru í umhvørvum, ið eru eyðkend av kriminaliteti, harðskapi og/ella rúsi, eru í serligum vanda fyri ikki at finna nakra leið til eitt trygt lív. Lítil endurmenning er í at revsa brotsligar gerðir við fongsli ella bótum. Tí ræður um at menna aðrar møguleikar at revsa brotsverk, har tað í einum tryggum umhvørvi verður lagdur dentur á sínámillum sambond heldur enn avbyrging.

Ein samfelag, sum er til reiðar at fevna um allar sínar borgarar, kemur ikki av sær sjálvum. Sosialpedagogar í Norðurlondum arbeiða hvønn dag fyri, at menniskju skulu uppliva, at tey megna sína tilveru og ikki, at tey detta burturímillum. Hesa ábyrgd hava vit í felag við nógv onnur yrki og fakfólk. Ikki minst myndugleikar og politiska skipanin hava stóra ábyrgd av skapa umstøður, sum tryggja, at tann sosialpedagogiski fakligi førleikin kemur til sín rætt í strembanini eftir, at tað eydnast øllum ungdómi at finna leið sína inn í samfelagið. Ungdómurin er framtíðin, og vit kunnu ikki loyva okkum at lata menniskjaligt tilfeingi fara fyri skeyti.



*Bjarni Beder skrivar*

# At vera lesandi á Námsvísindadeildini anno 2015

„Skal man ganga í skúla fyri at ansa børnum?" Hendan setning munnu nógv okkara hava hoyrt meiri enn einaferð. Til hetta kunnu vit nokk siga bæði ja og nei. Nei, tí at vit ikki bara ansa børnunum. Vit eru um tey, geva teimum møguleikar og karmar at læra og menna seg í og hava vitanina til at síggja, hvat ið er gott fyri barnið. Ja, tí at vitanin byggir á ástøði, og tað eru hesi ástøði, ið eru grundarlagið fyri, at vit kunnu geva og skapa menningarmøguleikar fyri øll. Bæði á dagstovnaøkinum og serøkinum.

Eitt orðatak sigur: „It takes a village to raise a child." Í dagsins samfelag eru tað stovnarnir (og skúlin), ið eru bygdasamfelagið. Í einum bygdasamfelag eru ymisk fólk við ymiskum førleikum, og soleiðis skal tað eisini vera á teimum ymisku stovnunum. Vit mugu hava fólk, ið ikki øll vita tað sama og hava somu førleikar. Hetta fáa vit gjørt nakað við sum lesandi. Vit fáa øll eina grundvitan um m.a. sálarfrøði, námsfrøði, sernámsfrøði og málmenning, men síðani kunnu vit velja okkum inn á linjur, so at vit eisini kunnu nema okkum servitan á summum økjum. Hettar er við til at geva ymiskar vinklar á arbeiðið sum námsfrøðingur.

Hesir somu vinklar koma okkum til góðar, tá ið vit koma út úr skúlanum. Ofta verður tosað um, at vit hava ov lítið av praktiskum royndum, tá ið vit eru útbúgvin, og ja, rætt er tað, men tað merkir ikki, at vit eru vánaligari námsfrøðingar enn tey, ið hava havt langar starvsvenjingar. Sjálvt um vit ikki hava royndirnar, so hava vit ástøðini, og ikki minni, førleikan til at finna tey røttu ástøðini. Royndirnar skulu vit nokk fáa.

Eitt stórt pluss við okkara útbúgving er, at vit hava nógv fak saman við læraralesandi. Hetta er við til at økja virðingina fyri fakunum; frá báðum síðum. Vit eru øll greið yvir, at á ávísum økjum eru lærararnir best skikkaðir, og á øðrum økjum eru tað námsfrøðingarnir, ið eru best skikkaðir. Hóast vit eru greið yvir hendan ymiskleika, so er virðingin góð millum bólkarnar. At vit hava so nógv fak saman gevur okkum eina jaliga tilgongd til tvørfakligt samstarv. Tað man vera hent nakrar ferðir, at kjak enda við tí niðurstøðu, at tá ið vit eru liðug útbúgvin, so skulu vit í hvussu so er arbeiða væl saman, bæði námsfrøðingar og lærarar. Tað átti eisini at verið ein sjálvfylgja í dag. Læring og menning eru so tætt knýtt, at tað er løgið, at gjógvin millum lærarar og námsfrøðingar er so djúp.

Hvussu kunnu vit so minka um hesa gjónna? Og er nakað svar uppá hvussu? Tað fyrsta er væl, at vit læra okkum at allýsa okkara fak betur. Og við okkara útbúgving vóna vit, at hetta fer at eydnast.



# Álitið um normeringar lagt fram í næstum

*Álitið um normeringar, sum ein arbeiðsbólkur hjá Pedagogfelagnum hevur gjørt, verður lagt fram fyri avvarðandi myndugleikar í vár.*

*Arbeiðsbólkurin, sum hevur gjørt álitið um normeringar, úr vinstru síðu: Mirjam Kjølbro, Jóna Guttesen, Maja Højsted og Jógvan Philbrow.*

*Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS*

Eina ferð í vár er ætlanin, at álitið um normeringar skal leggjast fyri avvarðandi myndugleikar, t.e. politikarar og eitt nú Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, KAF. Tað sigur Bjarni Beder, nevndarlimur í Pedagogfelagnum.

Bjarni Beder sigur, at endamálið við álitinum millum annað er at vísa á eina felags loysn við normeringum, tó við atliti at teimum serumstøðum, sum eru á námsfrøðiliga økinum.

## Atlit

Í álitinum verður nomið við atlit, sum mugu takast. Arbeiðsbólkurin sigur millum annað:

– Stóri spurningurin hevur leingi verið, hvussu komið verður fram til neyvastu tølini, og hvat veruligi tørvurin á tímum er. Vit, sum manna arbeiðsbólkin, hava roynt at sett orð á, hvørji atlit eiga at vera tikin, tá ein normeringslykil verður settur saman. Hetta er gjørt við leiðarafundinum 2. september 2014 í huga, har fleiri viðmerkingar og hugskot vóru frammi:

- Stødd á stovni
- Hvussu stovnurin hevur opið
- Aldursbýtið á stovninum
- Karmarnir um stovnin/umhvørvið
- Staðsetingin – í bygdum øki ella við ein útjaðara
- Námsfrøðilig krøv
- Trygd og trivnaður hjá børnum og starvsfólkum

## Normeringar

Arbeiðsbólkurin sigur, at fyri at kunna taka atlit til, at ymiskir stovnar hava opið ymiskar tíðir – úr 9 í 12 tímar um dagin, hava vit gjørt ein lykil, ið tekur støði í, hvussu tíðin kundi verið býtt upp – í fyrsta lagið í minuttir pr. tíma, soleiðis at tað síðani kann roknast út eftir, hvussu leingi ein stovnur hevur opið, tí sjálvandi krevjast fleiri tímar, tess longur ein stovnur hevur opið. Samstundis er lykilin aldursuppbýtur og tekur støði í vanliga tørvinum hjá einum barni.

## September

Tað var á einum fundi, sum Pedagogfelagið skipaði fyri saman við námsfrøðiligum leiðarum 2. september í 2014, at ein arbeiðsbólkur varð settur at gera álit um normeringar. Arbeiðsbólkurin hevur arbeitt skjótt, og álitið varð handað nevndini í felagnum longu 26. november. Bólkurin hevði tá eina framløgu um álitið.

Maud Wang Hansen, forkvinna í Pedagogfelagnum, vísti á fundinum 2. september á, at ongi lógarfest normeringstøl finnast, og tað ger tað so mikið týdningarmiklari at varpa ljós á hetta økið, so politikarar kunnu tryggja góða normering.

Tað var sum heild breið semja á fundinum um, at greiða skal fáast á normeringunum.

Ein arbeiðsbólkur varð settur at arbeiða við málinum, og í vár verður tað so lagt fram fyri avvarðandi myndugleikar.



# Stórt gagn av norðurlendskum samstarvi

*10.-12. okt. 2014 var eg í Helsinki á fundi við lesandi í Norðurlondum. Hesin fundur var ein liður í einum samstarvi, Føroya Pedagogfelag hevur við fakfeløg í Norðurlondum. Tað var NLS – Nordiska Lærerorganisationers Samråd, ið saman við SOOL, fakfelagnum hjá lesandi í Finlandi, skipaði fyri fundinum.*

Orð: Hildur Kruse Sørensen, námsfrøðilesandi

Hetta er aðru ferð, eg eri við á einum slíkum fundi, og eins og fyrru ferð, so var hetta ein sera áhugaverd uppliving. Tað er læruríkt at møta lærara- og námsfrøðilesandi úr øðrum londum. Tað gevur innlit í, hvussu umstøðurnar eru aðrastaðni. Eitt, sum t.d. er eins í flestu londum er, at lønin hjá einum námsfrøðingi er lægri enn hjá einum lærara. Eitt, sum harafturímóti brýtur frá, er, at í summum londum eru lærarar og námsfrøðingar í sama fakfelag. Á einum slíkum fundi verða øll umrødd sum lærarar, tí at aðrastaðni eru øll, sum arbeiða við menning og læring, lærarar. Eitt nú er ein námsfrøðingur í Noregi ein „førskolelærer".

Tá ið nú fundurin var í Finnlandi, høvdu tey fyrireikað ein fyrilestur við Armi Mikkola frá undirvísingarmálaráðnum, ið tosaði um læraraútbúgvingina í Finnlandi. Hvat tað er, sum ger ta finsku útbúgvingina so góða, og hvussu man kann halda støðið í framtíðini. At ansast má eftir, at tað góða, sum er bygt upp, ikki hvørvur aftur. At man má varðveita tað, man hevur.

Eisini var tosað um teir finsku venjingarskúlarnar, tí norðmenn nú ætla at fáa venjingarskúlar. Í Noregi hava lærarar trupulleikar at fáa praktikkpláss, og tí eygleiða tey finnar. Í Noregi fara tey eisini at gera læraraútbúgvingina til master, eins og í Finnlandi.

Norðurlond hava gott samstarv, og eitt av samstarvsevnunum eru útbúgvingarnar. At gera útbúgvingarnar til master-útbúgvingar er nógv frammi í norðurlendskum samstarvi, og eisini í heimshøpi. M.a. er „barnagarðslæraraútbúgvingin" (námsfrøðiútbúgvingin) í Finnlandi á kandidatstøði. Útbúgvingin hoyrir til universitetið, og tað eru upptøkuroyndir til útbúgvingina. Av tí sama leggur tað eitt ávíst støði fyri námsfrøðingarnar, og plássini á útbúgvingini eru ógvuliga umbiðin.

Tosað varð eisini um arbeiðstíð hjá lærarum. Hvussu nógvir tímar vóru í einum ársverki í teimum ymisku londunum. Her var munur á londunum, tí í summum førum vóru tað kommunurnar í londunum, ið vóru arbeiðsgevarar og tí ásettu tímatalið.

Eitt annað evni, ið varð umrøtt, var bygnaðurin av teimum ymisku feløgunum. Her er tað rættiliga ymiskt, hvussu feløgini eru uppbygd, og eisini viðvíkjandi limatali eru stórir munir. Lærerforbundet Student í Svøríki hevur umleið 24.000 limir. Í hesum førinum kunnu vit ikki meta okkum javnt við sviar, men bæði felagið hjá teimum grønlendsku lesandi og hjá finnlands-svenskarunum eru á støðd við okkara felag. Tað var áhugavert at hoyra, hvussu hesi ymisku feløgini vóru uppbygd, og hvussu tey arbeiddu.

Góðar tvær vikur fyri hendan fundin vórðu 43 læraralesandi í Meksiko burturflutt, tí at tey mótmæltu ójavna í lønarskipanini. Hetta var eisini tosað um á fundinum, og har varð gjørd ein yvirlýsing viðvíkjandi rættindunum hjá læraralesandi. Umboð frá øllum luttakandi feløgum undirskrivaðu hesa yvirlýsing.

– Nógvastaðni í heiminum er sera vandamikið at siga sína hugsan alment, sum eisini hendingin í Meksiko er prógv um. Útbúgving er eitt týðandi amboð at bøta um heimsins viðurskifti, har eisini útbúgvingin av lærarum og námsfrøðingum hevur ein sera týðandi leiklut, verður m.a. sagt í yvirlýsingini, sum harðliga átalar tað, sum hendi í Meksiko.

Eftir eitt slíkt vikuskifti er nógv at hugsa um. Tað er nógv at læra við at luttaka á slíkum ráðstevnum, og vónandi heldur hetta samstarv fram.



# Bindifestivalur á Fanø

Orð: Dagmar Beder

## Fyrst nøkur orð um Stíggj

**Verkhúsið Stíggjur** er ein vardur verkstaður við 27 arbeiðsfólkum og 6 starvsfólkum.
Hesi 27 arbeiðsfólkini hava sína dagligu gongd frá 8.30 til 16.00 á Stíggi. Nøkur teirra framleiða vøru til handilin, og onnur, sum ikki megna tað, fáa stimbran og upplivingar av ymsum slag.

**VERKHÚSIÐ STÍGGJUR ER Í 4 EINDUM:**

- **Ítriv**, har tað verður bundið, seymað o.a.
- **Norðurstova**, har tað verður málað, límað, teknað, rippað o.a.
- **Verkstaðið**, har tað verður sagað, smíðað, pussað , málað o.a.
- **Fjálgalon**, har smærri ítrivstilboð eru, og sansastimbran av alskyns slag eru í boði.

Hjá flestu arbeiðsfólkunum hevur tað stóran týdning at virka eina vøru, og at hendan verður virðismett. At vera við í eini tilgongd og einum felagsskapi, har vøran verður gjørd frá byrjan til enda, og at hon til seinast verður løgd oman í handilin til sølu. Hæddarpunktið er, tá kundar koma inn at keypa og fara nøgdir útaftur. Hettar gleðir arbeiðsfólkini og økir teirra sjálvsvirði og sjálvsálit. Tí er tað av størsta týdningi, at vit sum starvsfólk eisini fylgja við, hvat er uppi í tíðini, soleiðis at vørurnar, sum vit selja, eru fjølbroyttar og nútímans.

Endamálið er at skapa ein tryggan og innihaldsríkan gerandisdag, har trivnaðurin er av størsta týdningi. Støði verður tikið í hvørjum einstøkum arbeiðsfólki, har málið er at menna tey, bæði handaliga, sosialt, mentalt o.s.fr.

## Ítriv.

Í ítriv arbeiða 9 kvinnur og 2 starvsfólk. Har verður nógv seymað og sera nógv bundið. Vit royna so vítt, sum til ber, at ganga ynskjunum hjá hesum damum á møti í arbeiðinum. Men ofta mugu vit laga tey til hvørja einstaka. Tær duga ikki altíð at meta um, hvat tær megna at gera og ikki. Vit gera so t.d. eitt mynstur einfaldari.

Fyri at fáa íblástur halda vit onkur bløð og leita á netinum. Tað er gott at sita saman við teimum og leita eftir íblástri, nógvar góðar samtalur koma burtur úr hesum løtum, og hugflogið fær frítt at fara . Hóast vit royna at fáa íblástur ymsastaðni frá, føla vit viðhvørt, at vit mangla fleiri møguleikar til íblástur. Við hesum felags áhuga í huga hava vit í fleiri ár tosað um at fara á *Strikkefestival* á Fanø.

Og í 2014 fóru vit at kanna møguleikan fyri, um hetta kundi lata seg gera. Fyrst og fremst, um hesar damur høvdu áhuga í at koma við, um møguleikar til at fáa fíggjarligan stuðul o.s.fr. Vit søktu ymsar grunnar, og tað eydnaðist okkum at fáa ein



part av pengunum til hendan túrin. Áhugin millum damurnar var stórur, og avgjørt varð at fara. Vit vóru 12 í tali, 8 arbeiðsfólk og 4 starvsfólk.

Vit fóru avstað 18. sep. og vóru í Danmark í 1 viku.

Bindiefestivalurin á Fanø var frá hósdegi til sunnudag. Vit búðu í tveimum íbúðum. Tiltøk vóru um alla oynna, og vit royndu at fáa sum mest burturúr. Tað merktist eisini væl allastaðni, at bindifestivalur var á oynni. Allastaðni vóru nógv fólk, handlar og matstovur vóru væl fyrireikað til hetta stóra tiltak. Umleið 10.000 komu út á Fanø til tiltakið.

Bindiefestivalurin var skipaður soleiðis, at høvuðstiltøkini gingu fyri seg í stórum tjøldum, sum vóru sett upp til endamálið. Annars vóru framsýningar og verkstovur í hølum kring alla oynna.

Vit vitjaðu sjálvandi tey ymsu støðini, men størsta partin av tíðini brúktu vit í tjaldinum. Har vóru sølubásar við áhugaverdum vørum, so sum tógvi, uppskriftum, stokkum, knappum og øllum, sum hoyrir binding til. Har var café, har vit keyptu okkurt lætt til matna, sjálvandi við stokkum í hond. Fyrilestrar, tónleikur og annað undirhald var eisini í tjaldinum.

Leygarkvøldið var tað heilt stóra gallakvøldið við góðum mati og undirhaldi. Sasha Dupon o.o. sungu fyri okkum. Tað var eitt av hæddarpunktunum á bindifestivalinum. Eisini vóru vit til eina áhugaverda bindigudstænastu.

Frá sunnudegi til hósdag búðu vit í einum stórum summarhúsi í Blåvand.

Hesar dagar tóku vit okkum meira av løttum, nutu møguleikarnar í summarhúsinum, vóru í wellness, fóru at shoppa o.tíl.



Eisini vitjaðu vit støð, sum vóru viðkomandi fyri okkum.

Fyrst vitjaðu vit *Naturværkstedet* uttan fyri Esbjerg; tey vóru blíð og fyrikomandi. Vit blivu boðin til kaffi og síðani runt á verkstaðnum, har vit fingu nýggjan íblástur. Vit góvu eisini teimum onkur hugskot. Tað var áhugavert at tosa við fólk, sum hava somu avbjóðingar sum vit. Vit høvdu nógv í felag.

Men tíverri liggur í kortunum, at hetta náttúruvakra staðið skal lata aftur vegna sparingar.

Eisini vitjaðu vit *St. Peders* í Ribe. Hetta er eitt stað, ætlað menningartarnaðum, sum ætlandi skulu út í samfelagið at arbeiða. Tey hava matstað, handil, seymistovu og verkstað. Fyri at arbeiða á matstaðnum krevst reinførisprógv, síðan vera tey lærd at arbeiða á einum matstaði við øllum, sum hartil hoyrir.

Á seymistovuni og verkstaðnum lærdu tey alt tað handaliga, og í handlinum lærdu tey at stilla vøruna pent fram, at vera fyrikomandi við kundarnar og at taka fyri og at handfara kassaapparatið.

Viðmerkjast skal, at umframt vørurnar, sum tey sjálv framleiða til víðari sølu, fáa tey eisini vøru frá øðrum verkstøðum har um leið, m.a. frá *Naturværkstedet.*

Samanumtikið kann sigast, at vit høvdu ein góðan og læruríkan túr, sum á ein heilt serligan hátt var við til at sjóða okkum enn betur saman.

# Gevið gætur – allir P76´arar!

Pedagogfelagið skipar tann 6. mai 2015 kl. 17.00 – 19.00 fyri fundi fyri teimum limum, sum eru fevndir av Pensionsordningen af 1976, sokallaðu P76´arar.

Fundurin verður í hølunum í Tungugøtu 1.

Endamálið við fundinum er at umrøða pensiónsviðurskfitini.

Av tí at Pedagogfelagið ikki hevur skrásett allar limir, sum eru fevndir av pensiónsskipanini, verða tit biðin um at venda tykkum til umsitingina á pedagog@pedagogfelag.fo áðrenn fundin.



# Ljós í Perluni

*Fyrstu viku í februar var framsýning í Perluni í Havn við lutum, sum børn í átta dagstovnum í Tórshavnar Kommunu høvdu gjørt seinast hálva árið.*

*Øssur Winthereig – PRESS*

Tað var myrkt inni í nýggju hølunum í Perluni í miðbýnum í Havn, sjálvt um tað var dagur uttanfyri.

Runt á gólvinum, á veggjunum og á borðum vístu børnini í teimum átta dagstovnunum, hvussu nógv kann gerast burtur úr tilfari, sum onnur ætlaðu at tveita burtur.

Felags fyri alt, sum var sýnt fram var, at børnini høvdu havt eitt felagsheiti at arbeiða við: Ljós.

Einastaðni var ljós blivið til eina ein rúgvu av skriðdýrum, plantum og øðrum – gjørt úr pappi – sum nú aftur fara at síggjast í natúruni, nú ljósið er um at koma aftur.

Onkur onnur børn høvdu gjørt ein flogvøll við øllum teimum ljósum, sum har eru at síggja. Uppaftur onnur høvdu gjørt lampur av ymsum slagi.

– Hetta er ein miðil í tí pedagogiska arbeiðinum, har vit síggja, hvussu nógv børn læra, tá tey sjálv sleppa av avgera, hvat og hvussu tey gera, sigur Gunrid Hansen, leiðari á Dagstovninum á Velbastað, sum saman við Biritu Arge hevur staðið fyri verkætlanini.

## Sjálvstøðugt arbeiði

Hugskotið við verkætlanini er at savna inn tilfar frá fyritøkum, handlum, virkjum og øðrum og endurnýta tað í pedagogiska arbeiðinum.

Á summum stovnum hava tey arbeitt miðvíst við verkætlanini, meðan aðrir stovnar hava havt tilfarið standandi, og børnini hava sjálv valt, nær tey brúka tíð til tað.

Tey vaksnu á stovnunum hava havt nakrar fundir – mest fyri at fáa iblástur, tí stovnarnir hava arbeitt sjálvstøðugt við sínum hugskotum. Summastaðni hevur tað verið ein stova, sum hevur arbeitt við verkætlanini og aðrastaðni hevur allur stovnurin verið við.

## Geva hvørjum øðrum hugskot

Verkætanin byrjaði eftir eitt skeið á Dagstovninum á Velbastað í september í fjør. Karin Eskesen, leiðari á ReMiDa í Odense, var ein av skeiðshaldarunum. ReMiDa er ein stovnur, sum savnar saman avlopstilfar og ger avtalur við vinnulív og fyritøkur um at lata teimum avlopstilfar til endurnýtslu í pedagogiskum arbeiði.

– Hetta er ófarligt at vera við í hjá børnunum, tí alt er rætt. Og tað er liðugt, tá børnini sjálv halda, at tað er liðugt, sigur Gunrid Hansen.

– Vit síggja, hvussu væl børn duga at býta uppgávur millum sín. Eitt barn dugir væl at líma, eitt annað at klippa og eitt triðja

Ruth Vang, leiðari á Barna- og ungdómsdeildini í Tórshavnar Kommunu, setti framsýningina.





Børn úr ymsum stovnum sungu og dansaðu, tá framsýningin var sett









Birita Arge og Gunhild Hansen, sum átti hugskotið til verkætlanina

at seta saman. Og børnini duga eisini væl at geva hvørjum øðrum hugskot, greiðir Gunrid frá. Tey verða kroyst til at hugsa nýtt, og tað skapar kreativitet.

Umframt at børnini læra um endurnýtslu og avlopstilfar, so læra tey eisini gjøgnum spæl, hvussu nógv tey sjálvi megna at skapa.

– Avbjóðingin hjá okkum vaksnu er at halda fyri munnin, tí børnini skulu sjálv finna uppá. Vit kunnu hjálpa, men tey skulu sjálv royna. Leikluturin hjá teimum vaksnu skal ikki vera stýrandi, men spyrjandi, sigur Gunrid Hansen.

## Felags innsavning

Hendan verkætlanin hevur ikki verið so øgiliga skipað, men um innsavning av endunýtslutilfari skal halda fram og víðkast, so verður neyðugt at skipa tað betur.

Á flestu stovnunum vóru tað børnini sjálv, sum høvdu tilfar við heimanífrá, antin sum var tveitt burtur heima ella frá arbeiðsplássum hjá foreldrum.

Tórshavnar Kommuna hevur funnið eina høll á Hjalla, har til ber at goyma tað, sum verður savnað inn frá fyritøkum og handlum. So er hugsanin, at stovnarnir sjálvir kunnu fara eftir tí tilfari, sum tey hava hug at brúka.

Men tað krevur helst, at onkur tekur sær fast av arbeiðinum í høllini.

Fyri stovnarnar hevur verkætlanin kravt nakað av eykaarbeiði, og fleiri staðni hevur verið neyðugt at

## Stuðul frá felagnum

*Skeiðið um at draga avlopstilfar inn í pedagogiska arbeiðið á dagstovnunum var stuðlað av Aktións- og upplýsingargrunninum hjá Føroya Pedagogfelag.*

Elin N. W. Tausen er forkvinna í Aktións- og upplýsingargrunninum:

„Endamálið við grunninum er at menna námsfrøðina í Føroyum, millum annað við vísa felagið í einum øðrum ljósi enn sum fakfelag. Ein av orsøkunum til at stuðla hesum skeiði var almenna framsýningin, sum er eitt høvi hjá okkum at vísa Pedagogfelagið í øðrum høpi enn í fakfelagsstríði“, sigur Elin N. W. Tausen.



*Vit verða ikki fødd við eini rúgvu av kenslum og hugsanum, eins og vit ikki verða fødd við einum liðugt mentum máli.*

# Kenslulig heilamenning

*Tann 26. nov. vóru vit í leiðararáðnum á skeiði í Danmark um „Vurderingsmetoder rettet mod intervention og udvikling ud fra NeuroAffektiv teori“.*

Hetta er sprottið av, at í september hevði Susan Hart skeið í Føroyum fyri sálarfrøðingar, námsfrøðinga og onnur á námsfrøðiliga økinum.

Susan Hart er saman við umleið 20 øðrum sálarfrøðingum í ferð við at menna tilfar, soleiðis at tað er møguligt at meta um/kanna kensluligu menningina hjá børnum/menniskjum (Emotional Development Scale, EDS).

Á skeiðinum, vit vóru á, vóru sálarfrøðingarnir Jesper Birck og Knud Hellborn, ið báðir hava verði berandi kreftir í arbeiðinum við at menna henda kanningarhátt.

Á Kafédegi fyri leiðarar í Pedagogfelagnum, sum verður í mars 2015, verður skeiðið lagt fram.

## **„Nevroaffektiv menning“** – Kenslulig heilabúning

Nú á døgum vita vit, at vit eisini brúka heilan bæði at sansa og føla við. Í samspæli við tey menniskju, sum eru tætt um okkum, teirra umsorgan og mátan, vit taka eftir teimum, læra vit líka frá, at vit eru borin í heim, at sansa og føla. Tað er í hesum kensluliga samspæli, okkara „sjálv“ mennist og búnast. Hesa búning rópa vit kenslulig heilabúning.

### Øll eru fødd við evnum at læra.

Eins og vit eru fødd við evnunum at læra at tosa, eru vit eisini fødd við evnunum at læra at kenna mun á tí, sum hugar okkum, og tí, sum ikki hugar okkum. Vit eru fødd við evnunum at læra.



**Hvussu menna vit so hesi evni, hvussu læra vit nakað nýtt?** Felagskenslu (kenslan at hoyra til ein felagsskap), evnini at læra at fáa og geva umsorgan og kærleika, og evnini at læra at skilja kenslur hjá øðrum.

Skal barnið læra at tosa, er neyðugt, at onkur tosar við barnið. Á sama hátt er neyðugt, at barnið upplivir, at onnur hava felagskenslu, at onkur skilur sínar kenslur, og at onkur vísir umsorgan og kærleika, um barnið skal læra at geva umsorgan og kærleika.

Námsfrøðingar kenna hugtakið NUZO – næsta menningarstig hjá Vygotsky. NUZO byggir á ta fatan, at tað at læra kemur av sær sjálvum, um tað, sum barnið skal læra, er forvitnisligt, avbjóðandi og liggur tætt at tí, sum barnið longu frammanundan dugir, so er møguleiki fyri, at tað eydnast barninum at læra tað, sum ætlanin var. Bæði børn og vaksin læra best í NUZO.

Vit bjóða ikki okkum sjálvum ella børnunum brattastu bjargaleiðir, tá vit fyrstu ferð fara til fjals við børnunum. Upplivingin hevði verði ræðandi og vandamikil, og møguleikin fyri at eydnast hevði verið sera lítil. Altso er hetta uttanfyri NUZO.

At semjast um, at brattastu bjargaleiðir er uttan fyri NUZO hjá barninum, er lætt, men samstundis geva vit okkum ikki altíð far um, at akkurát sama NUZO er galdandi fyri sansa- og kenslubúningina av heilanum á barninum.

Umráðandi er, at vit námsfrøðingar eygleiða sansa- og kenslumenningina hjá børnunum, so at vit kenna teirra NUZO viðvíkjandi sansum og kenslum. Við hesum í huga kann námsfrøðingurin skipa eitt umhvørvi, sum gevur barninum møguleika at ogna sær forvitnisligar og avbjóðandi upplivingar, sum eydnast. Soleiðis menna børnini eina sunna sjálvskenslu og tora at fara undir næstu avbjóðandi uppliving.

# Hin tríeindi heilin

*Søguliga eru gjørt nógv tilfar, sum kann meta um fatanarligu førleikarnar hjá barninum. Dugur barnið at tosa? Skilur barnið felagsboð? Er barnið skúlabúgvið?*

Enn kenna vit einki tilfar, sum til fulnar kann hjálpa okkum at meta um førleikar hjá barninum viðvíkjandi sansum og kenslum. Hinvegin hava vit fingið vitan um, hvussu heilin búnast. Og tað er skilagott hjá okkum námsfrøðingum at brúka ta vitanina.

Í dag skilja vit heilan hjá menniskjanum í trimum løgum.

- Skriðdýraheilin
  – tað autonoma nervalagið
- Gamli súgdýraheilin
  – tað limbiska kervið
- Nýggi súgdýraheilin
  – præfrontalt cortex

Alt lívið økist samstarvið millum hesi trý heilaløgini, tá milliónir av nervatræðrum binda løgini saman.





Hetta rópa vit, at neuronnetverkið veksur. Tá barnið verður stimbrað og fær avbjóðingar í NUZO, veksur neuronvetverkið, og barnið fær øktan førleika at skilja seg sjálvt og onnur, bæði við sansum, kenslum og fatan.

### Skridýraheilin – Tað autonoma nervalagið- sansandi heilin

Vit menniskju merkja og skilja tað, sum hendir í tí autonoma nervalagnum sum sansir, vit sansa í egnum kroppi, og vit sansa tað, sum er í umhvørvinum. Sansanin er neyðug fyri at menna evnini at gáa eftir, at spegla, at stilla seg við onnur og at leita sær umsorgan, troyst og gleði hjá øðrum menniskjum. Hetta eru evni, ið ikki kunnu lærast við tilvitaða viljanum, hetta mennast í tí ótilvitaða, tá barnið verður møtt við hesum evnum í øðrum menniskjum. Tað er í hesum djúpa lagnum av stillaðum samanspæli millum menniskju, at samband, áhugi og álit verður til.

Sum frammanundan nevnt, so eru vit fødd við evnunum at kenna mun á tí, sum hugar okkum, og tí, sum ikki hugar okkum. Autonoma nervalagið búnast sunt, tá barnið í mestan mun verður møtt við atferð, sum hugar barninum. Strongd, traumatiskar upplivingar og undirstimbran skapa órógv skipanini, soleiðis at barnið missir evnini at finna javnvágina millum tað, sum hugar, og tað, sum ikki hugar barninum. Finnur barnið ikki javnvágina, so verður kropsliga reaktiónin ótilvitað stýrd av autonoma nervalagnum, soleiðis at barnið fer í stríð, flýggjar ella frystur.

### Gamli súgdýraheilin – tað limbiska kervið – kensluligi heilin.

Tað er í limbiska kervinum, at barnið goymir kensluligar roybndir, sum tað fær í sambandinum við onnur menniskju. Hesar kensluligu royndirnar eru avgerandi fyri, hvussu barnið restina av lívinum megnar at hava tilknýti við onnur menniskju. Tað limbiska kervið búnast á besta hátt, tá ið barnið fær kensluligar upplivingar og royndir, sum huga barninum. Samstundis er týdningarmikið, at vit ikki forða barninum at fáa kensluligar upplivingar, sum ikki huga so væl. Tað er samanspælið millum hugaðar og minni hugaðar upplivingar, sum tryggjar, at barnið mennir kensluligan fleksibilitet, og at barnið megnar at vera rúmligt í mun til onnur menniskju. Við hesum royndum gerst barnið ført fyri at finna kensluligu javnvágina aftur av sær sjálvum, tá tað missir kensluliga fótafesti eina løtu.

### Nýggi súgdýraheilin – præfrontalt cortex – hugsandi heilin

Hesin parturin av heilanum er seinast at búnast og tryggjar, at vit kunnu hugsa um sansir okkara og kenslur, so at vit hava tilvitaðar upplivingar av okkum sjálvum. Hugsandi heilin tryggjar, at vit megna at hugsa skilagott, at vit hava ímyndingarevni, at vit megna at reflektera og tilvitað kunnu leggja viðurskifti til rættis.

Í sambandi við kensluligu heilabúningina eru vit áhugað í teimum tankum, sum snúgva seg um at skilja seg sjálva/n og skilja onnur. At skilja seg sjálva/n uttanífrá og skilja onnur menniskju innanífrá kalla við at mentalisera. Mentaliserandi tankar í hugsandi heilanum snúgva seg um okkara áskoðan á okkum sjálv, onnur og umheimin.

Kenslan av týdninginum í øðrum menniskjum og barnsins ynski at stilla seg í mun til onnur, er grundarlagið fyri, at barnið kann hava tamarhald á sínum sansum og kenslum og megna at finna javnvág millum tað, sum barninum hugar, og tað, sum barninum ikki hugar so væl. Hesar førleikar mennir barnið í tilvitaðum samrøðum við vaksin, og hesir førleikar mennast alt lívið.

### Menningarumhvørvið

Samanum tikið ber til at siga, at teir tríggjar partarnir av heilanum umsita ymiskar partar av búningini í barninum. Umráðandi er, at vaksin skipa eitt umhvørvi har barnið hevur møguleika at menna sínar sansir, kenslur og hugsanir. Tá barnið missir fótafesti, tað veri seg í sansum, kensluliga ella fatanarliga, er tað ábyrgdin hjá okkum vaksnu at vegleiða barnið, soleiðis at tað aftur finnur javnvágina millum tað, sum hugar barninum, og tað, sum ikki hugar barninum so væl.

Tað er uppgávan hjá okkum námsfrøð-ingum at skipa eitt umhvørvi, har barnið støðugt fær vaksið um sítt nevronnetverk, soleiðis at barnið hevur størri møguleika at skilja tað, sum kroppurin sansar; tað, sum kenslurnar spæla og tilvitað at samansjóða tær upplivingar, barnið hevur av sær sjálvum í eina sunna sjálvsmynd, har barnið hevur álit á og kennir sínar egnu reaktiónir og atferð.

# Nevroaffektiv ástøði

*Vit hava nógva vitan um vinstru heilahálvu, tað vil siga fatanarligu menningina, sum nógv hevur verið tosað um síðstu árini.*



Harafturat hava vit hesi seinastu árini fingið meira vitan um høgru heilahálvu, har kensluliga menningin eisini fer fram. Hetta er tað, sum verður rópt *nevroaffektiv ástøði*.

Tað er umráðandi at kunna lesa nervalagið hjá einum barni. Hetta er fyri betur at kunna skilja barnið. Í aldri kann tað vera fimm ár, ímeðan tað kensluliga einans er tvey ár. Tað kensluliga er ikki altíð aldurssvarandi, og tí gevur tað meining at vita hetta um nervalagið. Hvat er tað, ið barnið dugir, og hvat er tað, sum er torført? Hvar kunnu vit seta inn?

Eisini er umráðandi at kenna sítt egna nervalag fyri at kunna hjálpa barninum. Ein afturvendandi spurningur er, at tað er torført at.....

*Vit kunnu lesa nervalagið hjá einum barni. Talan er um trý nervaløg, og hesi eru:*

1. Primitiva sansandi økið í nervalagsskipanini, sum fevnir um kropskenslu og orkufyrisiting.
   Tað snýr seg t.d. um at kenna hita og kulda, at kenna ampa, vælveru og at kunna stýra orkuni í kroppinum.
2. Limbiska kensluliga økið í nervalagsskipanini, sum fevnir um kensluna at hoyra til, tilknýtið, kenslur sum vreiði, gleði og sorg eins og tað at skapa samband við onnur menniskju.
3. Tað præfrontala økið í nervalagsskipanini, sum fevnir um persónsmenskuna og mentalisering, sum er tað fatanarliga t.d. at skilja.
   Hetta fevnir eisini um evnini at liva teg inn í støðuna hjá einum øðrum menniskja, læra av støðuni, kenna seg sjálva/n, at brúka viljan at stýra sær, at síggja seg sjálva/n uttanífrá og at síggja onnur menniskju innanífrá í mun til onnur.

Hesar tríggjar nervalagsskipanirnar búnast spakuliga upp gjøgnum barnaárini og gerast betur og betur førar fyri at arbeiða saman. Tí er tað umráðandi at kenna hesar skipanirnar, soleiðis at tú veitst, hvar tú skalt seta inn í mun til búningina. Møguliga setir tú barninum ov høg krøv? Kann barnið fáa betur burturúr, at tú nýtir kropsburð og andlitsbrøgd, heldur enn at tosa við tað?

Barnið kann so líðandi læra at tálma impulsinum, t.d. tá ið tað skal bíða eftir tørni, og tá ið tað skal kunna stýra sær í mun til støðuna.

Vit stilla nervalagið í sambandinum við onnur menniskju. Tí er tað umráðandi, at vit sum starvsfólk eru í javnvág, fyri at børnini kunnu kenna seg trygg og ikki fara upp at garta. Um vit kenna okkum strongd, ávirkar hetta børnini. Tí er tað t.d. umráðandi at tosa við starvsfelagar ella at fáa hjálp uttanífrá.

Pedagogar, sum fingu prógv á Føroya Læraraskúla í 1990.



# Serstøk løta fyri 1990-ára námsfrøðingar

*Í sambandi við, at 25 ár eru liðin, síðan fyrstu námsfrøðingarnir fingu handað prógv við Føroya Læraraskúla, skipaði Pedagogfelagið fyri móttøku at hátíðarhalda 25 ára dagin.*

*Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS*

Útbúnir námsfrøðingar frá Føroya Læraraskúla í 1990 – teir fyrstu yvirhøvur av Læraraskúlanum, fyrrverandi lærarar, nevndarlimir í Føroya Pedagogfelag o.o. vóru við til hátíðarhaldið leygardagin 31. januar í ár.

Saman við góðum til matna, røðum og guitartónleiki hjá Davidi Eriksen, mintust lærarar og fyrrverandi næmingar aftur á góðar løtur á Læraraskúlanum, í starvsvenjing og á uttanlandsferðum, m.a. í Noregi og Svøríki.

Pauli Nielsen, fyrrverandi rektari, mintist á hugnaligar uttanlandsferðir, men hann mintist eisini aftur á spennandi byrjanina.

– Umframt okkurt hissini skeið fyri onkrum dagstovni var hetta jú nýtt hjá okkum á Føroya Læraraskúla, og tí trilvaðu vit okkum stundum fram. Men hendan tíðin saman við tykkum næmingum var rættiliga spennandi og lærurík, segði fyrrverandi rektarin.

Hann vísti á, at áðrenn føroyska útbúgvingin varð sett á stovn, høvdu fleiri føroyskar kvinnur – og hendinga maður – tikið pedagogútbúgving í Danmark, onkur í Noregi og uppaftur onkur einstakur í Íslandi. Umframt hesar virkaðu eisini katólskar systrar úr ymiskum londum sum pedagogar í sínum barnagarði.

– So hvørt sum tørvurin á pedagogum vaks, vaks eisini trýstið at fáa eina føroyska útbúgving í Føroyum; serliga frá føroyskum lesandi uttanlands kom hetta trýstið. Pedagogfelagið varð eisini stovnað um hetta mundið, og Pedagogfelagið skundaði sjálvandi eisini undir, segði Pauli Nielsen.

Pauli Nielsen var í starvi sum lærari í námsfrøði á Læraraskúlanum um hetta mundið, og hann minnist serliga eldhugaðu kvinnurnar, sum tá vóru staddar niðri í Danmark. Tá tær komu heim til jóla og í summarfrí ella vóru heima í starvsvenjing, so gingu tær á skrivstovuna á Læraraskúlanum og løgdu síni sjónarmið fram um, hvussu umráðandi tað var at fáa útbúgvingina í lag her heima í Føroyum.

– Eg minnist við virðing og stórari gleði aftur á árini saman við tykkum á Læraraskúlanum. Tey vóru ómetaliga lærurík fyri meg, víðkaðu mær sjónarringin og lærdu meg, at vegirnir eru nógv fleiri til læru enn sjálvt ein rebellur, sum eg tá var, hevði dugað at sæð, segði fyrrverandi rektarin á Føroya Læraraskúla, Pauli Nielsen, millum annað.



Hýrurin var góður 25-ára hátíðardagin.
Mynd: Grækaris D. Magnussen

## Verjið føroyska málið

Sjúrður Poulsen, fyrrverandi lærari, fegnaðist um at síggja hesar fyrrverandi næmingar sínar aftur. Hann hevði eisini eina áheitan á teir:

– Tað er so umráðandi at røkja málið, og at læra børnini at tosa rætt, serliga at benda. Eg hoyrdi hendan dagin í útvarpinum tveir menn tosa. Tá ið teir vóru lidnir, takkaði verturin fyri. Hin svaraði við at siga „sjálv takk". Í hesum førinum eitur tað sjálvandi „sjálvur" takk, tí talan var um ein mann. Hetta er sjálvsagt eisini ein uppgáva hjá skúlunum, men vælsignaði roynið tit eisini, segði Sjúrður Poulsen.

– Næmingarnir mintust eisini við gleði aftur á lestrartíðina. Men tað var samstundis við sorgblídni, tey mintust, tí tvær teirra eru ikki ímillum okkum longur.

Í dag er onki, sum eitur Føroya Læraraskúli longur. Hann er lagdur undir Fróðskaparsetrið, og rektarin á Setrinum, Sigurð í Jákupsstovu, nýtti eisini høvið at siga nøkur orð og at heiðra næmingarnar hendan 25 ára hátíðardagin.

## Brot úr røðu hjá forkvinnuni

Forkvinnan í Pedagogfelagnum, Maud Wang Hansen, ynskti eisini námsfrøðingunum hjartaliga til lukku við 25 ára degnum. Hon segði m.a., at útbúgving sum námsfrøðingur er samfelagsligi grundarsteinurin, og tann týdningarmesti lærdómurin, nakar kann nema sær.

– Eg ímyndi mær tann dagin, tit byrjaðu útbúgving tykkara, eg síggi tykkum sum kópar, sum koma upp á land og kasta av tykkum hamin, meðan tit dansa og liva sum vanlig livandi menninskju, eina løtu meðan eingin sær, helt hon fyri.

## Kravdi dirvi

Forkvinnan í Pedagogfelagnum segði, at tað er eingin ivi í hennara høvdi um, at tað at nema sær útbúgving sum námsfrøðingur í Føroyum fyri 25 árum síðani var nakað, sum kravdi dirvi og eina serliga tráan eftir at gera mun. Hon ivast ikki í, at fólk sóu pedagoglesandi við vanvirðing og undran.

– Tað verður staðfest í bókini „Hygg, pedagogarnir eru komnir", har kenda skaldið Jóannes Nielsen, sigur soleiðis:

*„Í sjeytiárunum vóru pedagogar illa lýddir. Teir vóru sagdir at máa støðið undan teirri klassisku móðurrolluni. Flestar konur so væl sum menn oman fyri tey fjøruti beinleiðis hataðu pedagogar. Vart tú pedagogur, vart tú samstundis hassjari. Og flestu hassjarar vóru kommunistar, og kommunistar vóru pr. definisjón annaðhvørt lesbiskar ella homoseksuellir. Við øðrum orðum var talan um eitt vandamikið fólkaslag, sum hótti tey ektaðu føroysku kristiligu virðini."*

– Á fakfagnaðinum í 2012 hoyrdu vit, hvussu undangongukvinnurnar, Katrin Petersen, Sólvá Johannesen, Carita Bjørklund og Julianna Næss, søgdu frá søgu okkara, hvussu umstøðurnar vóru tá, og hvussu fólk í samfelagnum reageraðu uppá námsfrøðingar. Onkur segði seg vera sparkaða og spýtta eftir, onkur var skírd at vera vandamikil fyri børnini og samfelagið sum heild, segði Maud Wang Hansen.



## Vandamiklir pedagogar

Maud Wang Hansen vísti á gamla grannan hjá ommu og abba sínum í Nólsoy, politikkaran Juul Jacobsen, sum segði, at allir „gogar" og „logar" eru vandamiklir, ja, meira vandamiklir enn atombumban. Sonur sama politikkara, sum varð borgarstjóri í Nólsoy, tá barnagarður lat upp í oynni, segði seg als ikki skilja, hví kvinnur skuldu nema sær útbúgving fyri at ansa børnum.

Mamma hansara aldi upp fleiri systkin uttan at hava nakra útbúgving. Tað hava flestu mammur í Føroyum gjørt, og tað fara tær at gera í allar ævir.

– Í dag eru bæði heimurin og fatanin vorðin ein onnur. Atombumban er framvegis ein hóttan, og enn er langt á mál, helt formaðurin í Pedagogfelagnum fyri.

Hon víst á, at størsti vandin fyri ikki at vinna fulla virðing, er, sum hon sær tað, frá politikarans síðu. Har liggur stóra stríðið í dag. So leingi politiska hugsanin bert er at skapa karmar og byggja ella keypa bygningar til námsfrøðiligt virksemi, fyri síðani at spara uppá raksturin, so mikið, at tað gongur út yvir námsfrøðiliga innihaldið, so er námsfrøðin í vanda og hevur ikki vunnið tað pláss, hon hevur uppiborið.

Forkvinnan í Pedagogfelagnum endurgav Rógva Thomsen, serfrøðing í námsfrøði, fyri at siga, at „…tað sum námsfrøðingurin ger er námsfrøði." So einfalt.

–Tit eru undangongufólk, og saman við kópakonuni í brimunum í gjár hava tit víst, at tit megna tær stóru skolurnar, tey ógvusligu brimbrotini, og at tit standa eins stinn, tá sjógvarnir hava lagt seg aftur. Kanska er tað, tá ódnirnar leika á og brimið dunar, at vit veruliga fáa høvið at prógva, at tann útbúgving, tit hava nomið, og tað starv, tit í dag røkja, er heimsins týdningarmesta", segði Maud Wang Hansen, forkvinna í Pedagogfelagnum, millum annað í røðuni.

*Lærarar hjá námsfrøðingunum, sum fingu prógv fyri 25 árum síðan: Aftast úr vinstru standa Árni Hansen, Heri Kragesten, Pauli Nielsen og Sigrid Dalsgaard. Sitandi úr vinstru eru Jorun Simonsen, Sjúrður Poulsen og Jógvan Telling.*
*Mynd: Grækaris D. Magnussen*



*Malan Houmann:*

# Spennandi at byrja í kripputíð

*Ein av pedagogunum, ið fingu prógv í 1990, er Malan Houmann. Fyri hana var tað ein serlig avbjóðing at byrja at arbeiða júst ta tíðina, sum nógvar familjur noyddust at rýma av landinum.*

*Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS*

- Tað var spennandi og avbjóðandi at fara undir námsfrøðiligt arbeiði, samstundis sum nógvar familjur noyddust av landinum. Tá kendi eg meg eisini hepna at fáa arbeiði. Eg fekk arbeiði úti á Velbastaðvegnum í Havn, sigur Malan Houmann.

Hon hevði arbeitt eini trý ár sum hjálparfólk, áðrenn hon fór at lesa á Læraraskúlanum, so hon var væl fyri. Nú, hon hevði fingið útbúgvingina, var hon rættiliga spent at koma í gongd.

– Vit vildu jú fegin brúka tað, vit høvdu lært, serliga tað, sum hevði við føroysk viðurskifti at gera. Frammanundan var alt jú danskt, øll tóku útbúgving í Danmark. Tað vóru danskir sangir, donsk ævintýr o.s.fr. Nú komu vit út við øllum tí føroyska, og tað var serliga spennandi. Okkum dámdi eisini so væl at arbeiða við tí kreativa, kvæðum og ævintýrum, sigur Malan Houmann.

Hon letur væl at hesum 25 árunum, síðan hon fekk prógv. Og henni dámar framvegis væl at arbeiða við námsfrøði.

– Mær hevur altíð dámt væl at arbeitt úti í natúruni, og tað havi eg havt møguleika fyri øll hesi árini. Eg havi altíð havt møguleika at fari út í natúruna við børnunum. Og eg haldi, at júst tað er besta námsfrøðin, sigur Malan Houmann.

## Nógv broytt

Tá ið hon hyggur at pedagogútbúgvingini í dag, heldur hon, at her er nógv broytt. Tá hon las, var stórur dentur lagdur á kreativu fakini. Og nógv teirra høvdu eisini drúgvar royndir við námsfrøðiligum arbeiði, áðrenn tey byrjaðu á skúlanum.

– Fyri mær at síggja er hetta nógv broytt. Fyri tað fyrsta er nú talan um eina bachelorútbúgving. Og sum eg havi skilt tað, so hava kreativu fakini minni pláss í útbúgvingini í dag, og tíðin í starvsvenjing er eisini stytt. Eg ímyndi mær, at tað má vera torført at koma út av skúlanum uttan praktiskar royndir, heldur Malan Houmann.

Hon vísir á, at tað er nógv broytt seinastu árini, síðani hon fekk prógv.

– Vit hava fingið nógvar stovnar aftrat, so nógvar, at nú mangla børn. Og tað er eisini trupult at fáa pedagogar út í barnagarðar, m.a. tí lønin er hægri á bústovnum, sigur hon.

## Vantandi eldrapolitikkur

Nú hon nærkast teimum seksti, er hon farin at hugsa um eldrapolitikkin. Hon heldur, at frá felagsins síðu kundi meira verið gjørt á hesum økinum.

– Í Danmark til dømis arbeiðir felagið við sonevndum seniorpolitikki. Og tað sakni eg her heima. Eg kundi væl hugsað mær at kunna trappað spakuliga niður – og fingið somu løn. Vit kundu hugt eftir, hvussu tey gera aðrastaðni, heldur hon.

Hon vísir á, at tú orkar ikki tað sama, so hvørt sum árini leggjast afturat.

– Hugsa tær til, at børn skulu dragast við eitt 67 ára gamalt, flennir Malan Houmann, sum vónar, at felagið fer at leggja seg eftir at skipa ein eldrapolitikk.



*Elisabeth Rasmussen:*

# Eg eri errin av mínum faki

*- At eg í dag kann hátíðarhalda 25 ára dagin saman við hinum, sum vóru í fyrsta pedagogflokkinum á Læraraskúlanum, er tekin um, at eg havi trivist í arbeiðinum. Og eg er framvegis errin av mínum faki, sigur Elisabeth Rasmussen, pedagogur.*

*Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS*

Elisabeth Rasmussen var ein teirra, sum hevði starvast sum hjálparfólk, áðrenn hon fór at lesa á Læraraskúlanum, og hon hevði eisini arbeitt eitt ár sum vikarur í skúlanum á Giljanesi. So hon var væl brynjað at fara í pedagogskúla.

– Eg eri framvegis fegin um møguleikan, eg fekk at lesa í Føroyum, tí eg hevði ongan møguleika at fara til Danmarkar at lesa, sigur hon.

Hon helt tað vera spennandi at byrja lesturin, tí tá bar til at heingja mongu ástøðini upp í tað, hon t.d. hevði gjørt sum hjálparfólk.

Elisabeth Rasmussen var tann allarfyrsti næmingurin, sum fekk prógv sum pedagogur á Føroya Læraraskúla. Men eitt lítið vónbrot fekk hon fyrst. Arni Ludvig skuldi vera próvdómari hendan dagin. Men veðrið gjørdist so vánaligt, at hann slapp ikki fram, so tað varð útsett. Tá var lagið ikki gott á teimum. Men seinni riggaði, og Elisabeth Rasmussen gjørdist fyrsti næmingur, sum tók føroysku útbúgvingina.

## Fekk starv beinanvegin

Longu áðrenn hon hevði fingið prógvið, hevði hon fingið starv í einum barnagarði. Og hon hevur arbeitt á barnagarðsøkinum síðan. Tað var eisini á barnagarðsøkinum, hon alla tíðina vildi arbeiða.

Spurd, hvat hon heldur um menningina hesi árini, er svarið greitt: „Lønin er ikki nøktandi, og eg sakni eldrapolitikk. Ein eldrapolitikk, har til ber at trappa spakuliga niður móti pensjónsaldri til 37-38 tímar. Í hvussu er haldi eg ikki, at full vika skal vera 40 tímar, tí tað er ógvuliga strævið at arbeiða við fólki."

Hon heldur annars námsfrøðina vera væl fyri í dag.

– Tú kanst nema tær útbúgving alla tíðina, tú kanst taka skeið av ymsum slag, so tær nýtist ikki at sita hendur í favn. Tað er tín ábyrgd, heldur Elisabeth Rasmussen.

Hon var ein teirra, sum tók stig til at heita á Pedagogfelagið at gera nakað við hendan 25 ára hátíðardagin. Og tað fegnast hon um.

– Eg fegnist um mítt fak, ikki minst errin eri eg um, at vit vóru fyrstu næmingarnir, sum fingu pedagogprógv á Læraraskúlanum. At tað eru 25 ár síðan, er hugvekjandi. Tí ynsktu vit at fáa Pedagogfelagið at varpa ljós á dagin, sigur Elisabeth Rasmussen.



# Inklusión

*Kunnu vit veruliga koma uttan um marginalisering við at víðka felagsskapin, soleiðis sum ætlanin er við inklusiónini, ella er talan bara um marginalisering innan fyri givnu karmarnar?*

*Kann ein formel inklusión tryggja tann einstaka ímóti eini óformellari eksklusión?*

*Ein av uppgávunum, tá ið man fæst við pedagogiska filosofi er at viðgera 'buzz'- orð og eitt av 'buzz'-orðunum innan pedagogiska heimin í løtuni er inklusión, sigur Gunnvá Edvardsdóttir, sum í løtuni lesur á Aarhus Universitet.*

Inklusiónshugsanin, ella hugsanin um tað inklusiva samfelagið, er ein politisk ideologi ella eitt ideal, ið er sett fram av ST og ber navnið Salamancakunngerðin.

Salamancakunngerðin er ein áseting, ið heitir á øll lond um at tryggja øllum borgarum rættin til útbúgving. Øll børn hava rætt til útbúgving á einum nøktandi lærustøði, og útbúgvingin skal, um yvirhøvur møguligt, vera á vanligum skúlum og stovnum.

Hugsanin er, at inklusivi skúlin skal leggja lunnar undir inklusiva samfelagið. Eitt samhaldsfast samfelag, ið berjist ímóti mismuni og skapar tryggar og rættar felagsskapir. Inklusiónin skal ikki bara tryggja borgarunum rættindi, men eisini atgongd til ein felagsskap, har tey kunnu vera virkin, luttakandi og vird. Tey skulu kunna kenna, at tey í felagsskapinum eru viðurkend, eru til nyttu, eru neyðug, eru ómissilig o.s.fr.

*Hugsanin er sum sagt, at inklusónin skal leggja lunnar undir eitt samhaldsfast samfelag, ið berjist ímóti mismuni og skapar tryggar og rættar felagsskapir.*

Um vit so hyggja at inklusiónshugsanini, soleiðis sum ætlanin í dag er at fremja hana í skúlunum og dagstovnunum, so skulu vit sum heild hyggja burtur frá eksklusiónini, tí hon er ikki loyvd. Í hesum eru ymiskar avbjóðingar/trupulleikar.

Hugsast kann, at tað verður álagt felagsskapinum at rúma meiri, enn hann í veruleikanum kann. Og í royndini at fáa felagsskapin at rúma meira, enn hann kann, fara vit at broyta normalitetsfatanina í felagsskapinum, og vit fara at laga tann einstaka til ella geva viðkomandi heilivág, soleiðis at viðkomandi passar inn, ella ið hvussu er ikki órógvar ov illa. Tí síggja vit eitt rák, har tørvurin á diagnosum veksur. Her gerst ein tørvur á eini ‘uppskrift’, soleiðis at vit kunnu fáa eina frágreiðing um ein óskiljandi atburð. Vit ynskja eina vegleiðing ella eina ‘nýtsluleiðbeining’.

Hetta ger eisini, at møguleikin fyri at vera við í differentieraðum felagsskapum hvørvur. Tað merkir fyri tey menniskju, ið høvdu gagn av hesum felagsskapum, at tey nú kunnu gerast einsamøll í einum víðkaðum inklusiónsfelagsskapi.

Salamancakunngerðin sigur, at allir borgarar skulu njóta síni rættindi til fulnar. Men munur er á at hava rættindi, og so at hava møguleika til at njóta hesi til fulnar. Tað er ymiskt, hvørjar fortreytir menniskju hava til at njóta síni rættindi. Um fortreytirnar av ymiskum orsøkum ikki eru har, tað kann t.d. vera av kropsligum, intellektuellum, sosialum, kensluligum ella málsligum orsøkum, so gerst møguleikin at njóta givin rættindi verri. Og tað eru ofta manglandi fortreytir, ið gera, at menniskju marginaliserast.

Tá tað so verður valt at víðka felagsskapin fyri at sleppa undan marginalisering, so svarar hetta umleið til at leggja nakrar $m^2$ aftur at veitsluhølinum, soleiðis at rúm er fyri øllum. Vónin er so, at nú, tá ið øll eru við til veitsluna, so fáa øll sama møguleika til ein dans. Trupulleikin er bara tann, at summi eru, har tað ikki er fysiskt møguligt at dansa. Summi hava ongan rútmusans, tey duga ikki at dansa. Summi hava ikki hug at dansa. Summi vilja heldur dansa fyri seg sjálv. Og so eru tað summi, ið ongin hevur hug at dansa við, og onnur, ið øll fegin vilja dansa við. So sjálvt um øll eru boðin við í veitslu, og øll hava rætt til ein dans, so eru tað ikki øll, sum dansa. Tað er møguligt, at tey, ið vóru tryggjað eitt pláss, tá ið veitsluhølið var víðkað, í staðin fyri at standa uttanfyri nú sita sum bonkrósa innanfyri.

Talast kann so fyri, at nú eru tey ið hvussu er inni, og at tað í sjálvum sær er framstig, men eg hugsi, at tað bara eru umstøðurnar, ið eru broyttar; sjálvur trupulleikin er ikki loystur. Leikvøllurin er størri, men spælið er tað sama. Harvið haldi eg, at talan er um marginalisering innan fyri víðkaðu karmarnar. Hugsast kann, at tað kundi verið betri at vera onkra aðrastaðni, enn at verða noyddur inn í eina veitsluhøll, har mann nú gerst bonkrósa.

Hugsanin er sum sagt, at inklusónin skal leggja lunnar undir eitt samhaldsfast samfelag, ið berjist ímóti mismuni og skapar tryggar og rættar felagsskapir.

Um talan skal kunna vera um ein felagsskap, so mugu vit hava okkurt í felag, annaðhvørt tað er ein felags áhugi fyri onkrum, ella ein áhugi fyri hvørjum øðrum sum persónum, sum medmenniskjum.

Fyri at eitt menniskja skal kunna uppliva seg sjálvt sum part av einum felagsskapi, má tað kenna seg viðurkent og virðismett. Tað má kunna kenna seg javnsett.

Tað skal altso meira til enn reglugerðir, karmar og ein góður vilji. Tá ið menniskju verða sett saman í ein bólk, t.d. ein skúlaflokk ella eina stovu á dagstovni, so eru vanliga reglur og normar um, hvussu vit umgangast. Hetta er fyri at tryggja ein góðan umgangstóna og tryggja, at ongin fær mein. Vit krevja m.a., at vit tosa hampiliga við hvønn annan, at vit eru høvisk. Men sjálvt um øll eru høvisk, sjálvt um talan ikki er um brot á reglur og normar, so er tað ikki vist, at vit gerast meira enn bara høvisk. Tað er ongin vissa fyri, at vit hava stórvegis saman, sjálvt um viljin er góður.

Tað, ið m.a. ger seg galdandi, er júst tað, at tey eru sett saman. Tá mann gongur í skúla ella á dagstovni, so er mann ikki har orsakað av áhuga fyri einum ella øðrum; mann er har, tí at onkur hevur sett ein har. Talan er frá byrjan av ikki um eitt sjálvvalt stað ella ein sjálvvaldan felagsskap. Í staðin verður talan um at royna at skapa ein felagsskap við teimum, sum eru har. Og tað er ikki vist, at har, í júst tí bólkinum, ein er settur í, er nakar, ið ein hevur nakað í felag við.

Tað merkir sjálvandi ikki, at tiltøk ikki kunnu ella skulu gerast fyri at stuðla felagsskapinum, men formella inklusiónin í sjálvari sær tryggjar ikki tann einstaka ímóti eini óformellari eksklusión.

At enda havi eg hug at leggja eitt aftrat, ið kann tykjast eitt sindur øvut. Av tí at inklusiónin er eitt politiskt ideal, so verður hon eisini eitt virðisgrundarlag. Tá ið inklusiónin verður virðisgrundarlag, kann so ikki hugsast, at um eg ikki sigi meg samda við inklusiónini, so eri eg ekskluderað ella havi ekskluderað meg sjálva?

Vit verða noydd at spyrja okkum sjálv, hvussu langt inklusiónshugsanin røkkur, tá ið vit skulu gera tað besta fyri einstaklingin í tí veruleikanum, viðkomandi er í.



*Fríða Lómstein og Rosa Sleire fáa, eins og búfólkini, nýggjar avbjóðingar við nýggju og øðrvísi umstøðunum í Klaksvík. Tær harmast tó um, at vit í Føroyum ikki hava eina lóg, sum minnir um donsku servisulógina, ið ásetur grundleggjandi rættindi og onnur viðurskifti hjá búfólkum á m.a. sambýlum og øðrum búfelagsskapum. Somuleiðis eru ásetingar um starvsfólkaviðurskifti, soleiðis at øll viðurskifti á økinum gerast greiðari.*

# Menningartarnað flyta í egna íbúð

*Stórt framstig við stórum avbjóðingum bæði fyri búfólk og starvsfólk*

Á Leitisvegi 17 á Glyvrum búgva sjey vaksin fólk, sum eru menningartarnað. Har hava tey búð seinastu seks árini, eftir teirra fýra ára skúlagongd á Rásini í Saltangará. Men á Leitisvegi verða tey ikki verandi, tí um nakrar vikur flyta tey í hvør sína íbúð í Klaksvík, sum Almannaverkið hevur latið bygt, og har Bústaðir hava staðið fyri byggingini. Hetta er fyrsta verkætlan av sínum slag í Føroyum. Til stórt gagn fyri búfólkini, men hetta gevur teimum eisini nýggjar avbjóðingar, eins og nýggju og øðrvísi umstøðurnar eisini geva starvsfólkunum nýggjar avbjóðingar.

Í Klaksvík eru bygdar tvær lonir við fýra íbúðum í hvørjari. Higar skulu fimm av teimum av Leitisvegi flyta, og tvey koma aðrastaðni frá. Áttandu íbúðina hava starvsfólkini. Námsfrøðingarnir Rosa Sleire og Fríða Lómstein, sum hava verið um búfólkini á Leitisvegi hesi seks árini, flyta samstundis arbeiðsstað til Klaksvíkar. Tær greiða frá, at nýggju umstøðurnar fara at broyta munandi um gerandisdagin hjá búfólkunum, samstundis sum eisini tær báðar fáa nýggjar avbjóðingar, bæði í sambandi við arbeiðstíð, m.a. nú náttarvaktin verður tikin burtur, og í innihaldinum í arbeiðinum.

–Tað er ikki yvir at dylja, at búfólkini her gleða seg almikið til nýggju umstøðurnar, sum vit eisini hava roynt at fyrireika tey til, tí tær verða so grundleggjandi øðrvísi enn í dag. Her á Leitisvegi hava tey hvør sítt kamar, men so er eisini alt sagt, tí alt annað hava tey felags við hini búfólkini – uppihaldsrúm, klædnarúm, bað og wc og harafturat alla matgerð. Hetta fáa tey alt fyri seg sjálv við nýggju umstøðunum, greiða tær báðar frá.

At menningartarnað flyta í egna íbúð í Føroyum er nýbrot, og við tí eisini nýggjar arbeiðsumstøður fyri starvsfólkini. Eitt nú í Danmark hava tey drúgvar royndir á økinum, og tí hava Rosa og Fríða verið eina námsferð har fyri at kunna seg um, hvussu tey har bera seg at. Tær vóru fyrst á einum bústovni í Keypmannahavn og á einum í Ålborg. Tveir rættiliga ymiskir stovnar.

## Royndartíð

Vinklen eitur stovnurin í Keypmannahavn, har tær vitjaðu. Serliga uppgávan hjá hesum stovni var at geva menningartarnaðu búfólkunum eina royndartíð, sum kundi vera upp í fimm ár, fyri at síggja í hvussu stóran mun búfólkini vóru før fyri at klára seg sjálv í egnari íbúð, á arbeiðsmarknaðinum ella í einhvønn skúla. Eina tílíka royndartíð hildu tey vera neyðuga, serliga fyri tey, sum komu úr onkrum heimi ella sambýli, tí broytingarnar eru so stórar.

– Her løgdu tey stóran dent á at lata tey menningartarnaðu ráða yvir sær sjálvum í mest møguligan mun, soleiðis at tey eisini tóku við fylgjunum av, at tey gjørdu okkurt skeivt, og hvussu tey sjálv kundu koma sær úr trupulleikunum aftur, greiða Rosa og Fríða frá. Hetta var rættiliga øðrvísi fyri tær báðar, sum í gerandisdegnum gjørdu munandi meira fyri at verja búfólkini. Her var eingin góða mamma. Fólkini skuldi uppliva lívsins beiska veruleika, sigur tær báðar.

## Ein heimadagur

Viðurskiftini í Ålborg líktust meira tí, sum verður í Klaksvík. Her búðu fólk í 11 av teimum 12 íbúðunum, meðan ein íbúð var til starvsfólkini, sum m.a. varð nýtt sonevnda heimadagin – hendan eina dagin í viku, tá búfólkini ikki vóru til arbeiðis. Hendan dagin kundu búfólkini boða frá, um tey vildu eta saman við hinum, og annars varð dagurin nýttur at vegleiða búfólkini um ymisk viðurskifti, soleiðis at tey í mest møguligan

mun kundu klára seg sjálvi – at matgera, dagliga reingerð, innkeyp, tannlækna, lækna og hvussu tey skilabest kundu ráða yvir sínum egnu pengum. Og tað er júst líknandi umstøður, sum bíða eftir teimum í Klaksvík.

### Teirra íbúð og heim

Rosa og Fríða eru fegnar um, at tær fingu møguleika at kunna seg um, hvussu tey, sum hava royndir á økinum, bera seg at.

– Sjálvandi hava vit eisini her roynt at vegleiða búfólkini til alsamt størri sjálvbjargni, men við nýggju og munandi broyttu umstøðunum í framtíðini eiga vit í mongum førum at hugsa eitt sindur øðrvísi. Búfólkni hjá okkum skulu nú venja seg við sjálv at gera mat og fara til handils og klára alt tað vanliga húsliga arbeiðið. Vit skulu geva teimum hóskandi avbjóðingar, samstundis sum vit hugsa um, hvat er realistiskt. Okkara búfólk eru líka ymisk sum øll onnur fólk, og tað eiga vit sjálvandi altíð at taka atlit til, siga tær báðar, sum eisini eru sannførdar um, at júst hetta at samskifta við hvønn einstakan verður munandi lættari, nú búfólkini fáa sítt egna.

– At samskifta við hvønn einstakan hevur ofta verið rættiliga trupult, nú øll hava verið saman um alt. Hetta gerst munandi lættari, tá ið vit kunnu fara innar í teirra egnu íbúð at tosa saman um persónlig viðurskifti. Teirra ynski og tørvur er sjálvandi ymiskur, og tað eiga vit altíð at hugsa um. Tað er teirra lív og umstøður tað ræður um. Hetta verður teirra íbúð og heim. Vit eru starvsfólkini, leggja Rosa og Fríða dent á.

Tey avvarðandi hava eitt gott samskifti við búfólkini, og nú hvørt búfólk hevur sína egnu íbúð, gerast umstøðurnar at fáa vitjan munandi betri.

### Meira sjálvstøðug

Tað er sum vera man altíð gevandi at kunna seg um royndir hjá øðrum, hóast umstøður eru øðrvísi. M.a. í hvussu stóran mun starvsfólk skulu vera um búfólkini.

– Sjálvandi skulu okkara búfólk altíð kenna seg trygg, men endamálið er eisini at gera tey so sjálvbjargin, sum til ber. Har vit vitjaðu í Danmark, fingu búfólkini fríari ræsur, enn vit geva okkara. Vit hava kanska lyndi til vera ov nógv um tey – verja tey í so nógv. Vit hava eisini lyndi til at spyrja tey, um tey vilja hava hjálp til eitthvørt, heldur enn at lata tey koma til okkara, hava tey hjálp fyri neyðini, siga Rosa og Fríða, sum ásanna, at ivaleyst er okkurt, sum tær hava fingið at hugsa um eftir eina læruríka námsferð í Danmark.



## **Størsti bólkurin** í Almannaverkinum eru **pedagogarnir**

*- Í Almannaverkinum arbeiða so nógv ymisk starvsfólk, at tey fevna um 14 ymisk fakfeløg, teirra millum eru pedagogar, sum er størsti bólkurin. Tað er ein avbjóðing og spennandi, og mær dámar tað, sigur Edvard Heen, stjóri í Almannaverkinum. >*



*Hann er dugnaligur vinnulívsmaður, men nú situr hann í stjórasessinum í Almannaverkinum. Og her trívist hann væl.*
*Mynd: Grækaris D. Magnussen*



*Stjórin í Almannaverkinum, Edvard Heen, metir námsfrøðiliga arbeiðið innan Almannaverkið vera rættiliga týdningarmikið, bæði hvat borgarunum, sum hava samband við Almannaverkið, viðvíkur, og eisini samfelagsliga. Mynd: Grækaris D. Magnussen*

*Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS*

Hann hevur áður sitið í leiðsluni í fleiri ymiskum vinnulívsfyritøkum. Nú situr hann sum stjóri í Almannaverkinum og hevur eina rúgvu av pedagogum sum síni starvsfólk.

– Eg visti, at hetta var eitt spennandi starv bæði fakliga og leiðsluliga, og tí sØkti eg starvið. Og tað hevur hildið; mær dámar hetta ógvuliga væl, eisini at samstarva við umboðini hjá pedagogunum, sigur Edvard Heen.

## Veikastu í samfelagnum

Edvard Heen vísir á, at Almannaverkið hevur við tey veikastu í samfelagnum at gera. Og tað er ongin sjálvfylgja, at tey verða inkluderað í samfelagið. Tað merkir tískil, at Almannaverkið hevur eina serliga fakligheit at taka sær av hesum fólkunum.

– Her er pedagogiska fakligheitin ein týdningarmikil brikkur. Tað hevur eisini nógv at siga fyri føroyska samfelagið, at vit kunnu bjóða eina tænastu og kvalitet í arbeiðinum, sum útvegar borgarunum eitt virkið lív aftur. Og her eru pedagogarnir týdningarmiklir, heldur hann.

Umleið 16.000 borgarar ella umleið ein triðingur av føroyska fólkinum hevur onkursvegna samband við Almannaverkið hvørt ár.

– Tey alraflestu eru væl nøgd, tað merkir, at vit „levera" vøruna. Tey 5-10 einstøku málini, har t.d. familjan heldur, at tey kundu fingið eina øðrvísi tænastu, tey málini síggjast best. Men nógv teir flestu borgararnir eru væl nøgdir, vísir Edvard Heen á.

## Meira opinleiki

Hann vil fegin hava Almannaverkið at duga betur at vísa á væleydnaðu málini. At vísa føroyingum, at tey gera eitt gott arbeiði í Almannaverkinum. Hann vísir eisini á, at Almannaverkið er eitt sindur afturlatið, t.d. er tað bara eitt telefon nummar, ringjast kann til, og bara ein teldupostur, skrivast kann til. Slík viðurskifti ynskir hann at fáa broytt, so stovnurin verður meira upplatin. Hann heldur tað eisini vera gott fyri starvsfólkini, at almenningurin kennir til góða arbeiðið, sum verður gjørt á stovninum. Hesum verður arbeitt við í løtuni.

– Vit skulu til dømis gerast betur at arbeiða tvørtur um tey ymsu ráðini. Til dømis hava vit longu sett á stovn eitt samstarv millum Almannaráðið, Heilsumálaráðið og Almannaverkið. Og eg vænti, at vit fara at síggja meira av hesum í framtíðini, sigur Edvard Heen.

Ætlanin er eisini at seta á stovn ein borgaraportal. Hetta verður ein portalur, har borgarin sjálvur kann fylla út oyðubløð av ymsum slag, sum hann nú noyðist at fara inn í Almannaverkið at avgreiða. Borgarin skal eisini hava lættari við at fáa innlit í egin mál.

## Námsfrøðiliga økið

Á námsfrøðiliga økinum hava tey sett í verk ávíst eftirlit. Ikki nakað lógarfest eftirlit, men eitt eftirlit, sum stovnurin sjálvur ynskir at hava. Og hesum letur stjórin væl at.

– Vit hava fingið jaligar afturmeldingar frá námsfrøðiliga økinum í sambandi við eftirlitið, sigur hann.

– Haraftrat hava vit ein bólk á Trivnaðardeplinum, sum m.a. hyggur at útbúgvingarmøguleikum hjá pedagogum, og í ár hava vit lagt dent á autismu og KRAP, sum er eitt slag av námsfrøði. Tað er eitt programm, sum skal styrkja okkum á námsfrøðiliga økinum. Men mítt serøki er ikki námsfrøði, so tað lati eg onnur við skili fyri námsfrøði taka sær av. Tað, sum hevur týdning fyri meg, er at fokus er á tað økið, sigur Edvard Heen.

Hann leggur dent á, at tað er týdningarmikið, at ymsu fakøkini verða ment, og námsfrøðiliga økið er ein stórur partur av tí.

## Stóran samfelagsligan týdning

Stjórin í Almannaverkinum heldur námsfrøðina í Almannaverkinum hava stóran samfelagsligan týdning.

– Skulu vit hava rúmligheit á t.d. arbeiðsmarknaðinum, so hevur tað stóran týdning, sum eg segði í áðni, at teir borgarar, vit hava samband við, koma út aftur á arbeiðsmarknaðin. Námsfrøðin er rættiliga týdningarmikil, um tað skal eydnast, og stórur partur av okkara starvsfólkum hava námsfrøði sum sergrein. Og tað er eisini her, vit í stóran mun royna at menna okkara borgarar.

– So samfelagsliga hevur tað stóran týdning, at vit hava pedagogar at arbeiða við hesum, heldur Edvard Heen.

## Væl nøgdur við samstarvið

Edvard Heen var kendur sum dugnaligur vinnulívsmaður, áðrenn hann gjørdist stjóri í Almannaverkinum. Nú eru tað ikki økonomar og onnur vinnulívsfólk, hann skal samstarva við, men m.a. pedagogar.

– Tað gongur av fínasta slag. Mítt serøki er leiðsla, fyriskipan og líknandi, og tað kann eg eisini brúka her. Fyri meg snýr tað seg um at síggja millum annað menningarmøguleikar og annars at hava áhuga fyri almannaøkinum.

– Higartil havi eg fingið rættiliga góðar afturmeldingar inni á stovninum. Her verði eg tikin fyri tann, eg eri, smílist Edvard Heen.



EDVARD HEEN

**Aldur:** 57

**Føddur/uppvaksin:**
Oslo, Noregi

**Útbúgving:**
Cand. merc., CBS,
Keypmannahavn

**Hví valdi tú at søkja stjórastarvið í Almannaverkinum?**
Arbeiddi í Noregi, ringdur upp og spurdur, um hetta ikki hevði áhuga. Eg visti, at hetta var eitt spennandi starv bæði fakliga og leiðsluliga.

**Arbeiðir higartil m.a.:**
BankNordik,
Tryggingarfelagnum,
BBS (Bankenes Betalingssentral),
Ementor (IT-leverandørur).
Siti í leiðsluni í øllum størvunum.

**Giftur við:**
Kristionnu Mohr

**Børn:**
2 børn

Fakfagnaður



# Fakligheit og dygd í námsfrøðiliga arbeiðinum

*Fakfagnaðurin 2015 – „Námsfrøði í verki“. Brot úr setanarrøðuni hjá forkvinnuni í Pedagogfelagnum, Maud Wang Hansen.*

Maud Wang Hansen metti tað sum ein heiður at seta henda fakfagnað og at varpa ljós á, at dagurin varð merktur av, at fakligheitin og dygdin í námsfrøðiliga arbeiðinum vórðu fagnað. Fjølbroytni, kreativitetur og námsfrøðilig dygd eyðkennir dagliga arbeiðið, sum útint verður á arbeiðsplássum kring alt landið, bæði hjá kommunum og hjá landinum.

– Í dag er so høvi at vísa og lýsa hetta fjølbroytni og at geva og taka til sín fakliga vitan og læra av royndum hjá hvør øðrum. A&U-grunnurin stendur á odda fyri hesum fakfagnaði, og ikki kann sigast annað enn, at tit við lýstu skránni liva upp til endamálið fyri grunnin, sum er at granska, styrkja og breiða út kunnleika og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum, segði hon.

## Fakligheit og arbeiðsumhvørvi

Áðrenn forkvinnan í Pedagogfelagnum gav gestarøðaranum, Tinu Maj Holm, orðið, hugleiddi hon eitt sindur um arbeiðið.

– Tá tú selur tína arbeiðsmegi, gert tú tað fyri at verða lønt afturfyri. Lønina skalt tú brúka til at uppihalda tær og tíni familju. Lønt arbeiði hevur verið kent í øldir, tó er lønin sum faktorur broytt nógv í sambandi við arbeiði.

– Í dag hevur samleiki, felagsskapur og persónliga kenslan av at gera mun og av at gera tað, ein hevur skil fyri og hug til, alsamt størri leiklut í sambandi við lønt arbeiði. Arbeiði er týdningarmikið fyri samfelagið og einstaklingin og ikki bert eitt frítíðarítriv hjá fínum konum í Havn, helt hon fyri.

## Krevur nógv

– Í dag krevur arbeiðið góðar fakligar førleikar, trúskap, stundvísi, tagnarskyldu, skrivliga skjalprógvan, og at tú gevur alt, tú eigur, til arbeiðsplássið. Ikki títt jarðiska ríkidømi, men tína tíð og uppmerksemi, og tað verður í stóran mun væntað av tær, at tú gert eitt sindur meira, enn tú veruliga hevur stundir til, ella meira enn tú í veruleikanum megnar ella hevur skyldu til, segði hon.

– Hjálpargenið er sett at arbeiða yvir, samstundis sum tað er undirlønt og undirmett av teimum, sum keypa tína arbeiðsmegi, nevniliga av politikarunum og okkara arbeiðsgevarum, segði forkvinnan í Pedagogfelagnum, Maud Wang Hansen, millum annað í setanarrøðuni.

Tine Maj Holm:

# Ov nógv krøv verða sett

*Tine Maj Holm, løgfrøðingur, ráðgevi hjá* ***Socialpædagogerne*** *í Danmark, segði á Fakfagnaðinum hjá Pedagogfelagnum, at alt ov nógv krøv verða sett samanborið við, hvat starvsfólkini megna at lyfta á arbeiðsplássunum.*

*Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS*

- Serliga á sosialpedagogiska økinum er trupult, tí har eru alsamt fleiri harðskapshóttanir, og tað veit eg eisini frá inklusiónini á barnagarðsøkinum. Tað snýr seg eisini um inklusiónpartin, og tað snýr seg um foreldur og onnur avvarðandi hjá børnum og ungum, sum í alt større mun bera seg hóttandi at. Og hetta er altso bæði galdandi í vøggustovum, barnagørðum og frítíðarskúlum, sigur Tine Maj Holm.

## Happing og særandi atferð

Tine Maj Holm undraðist á, at happing fyllir so nógv í arbeiðinum hjá pedagogum. Tí tað hevur við relatiónir við onnur at gera. Og er tað nakað, pedagogar eiga at duga væl, heldur Tine Maj Holm, so er tað sambandið við onnur.

– Vit vita, hvussu vit skulu bera okkum at í sambandinum við onnur. Men her snýr tað seg um happing í sambandi við starvsfelagar okkara og leiðslur. Tað snýr seg ikki í hesum sambandinum um at happa børn ella avvarðandi. Spurningurin er hví, støðan er sum hon er. Er tað kanska trotið á starvsfólkum, spyr hon.

– Spurningurin er eisini, um orsøkin er ein onnur. Tí hjá pedagogum er arbeiðið ein stórur partur av samleikanum júst at vera pedagogur. Og verður tú álopin á tína fakligheit, so kenna nógv tað sum happing, sigur hon.

Tine Maj Holm vísir á fleiri dømi um arbeiðsskaðar í Danmark, har limir melda fyri happing, m.a. tí leiðslan hevur rópt tey inn í sambandi við ávíst arbeiði, tí leiðslan metir tey ikki hava fylt vanligari mannagongd og tí háttalag, semja annars var um at nýta á viðkomandi arbeiðsplássi.

– Og tað kenna starvsfólkini so áleypandi í mun til teirra persónligheit, at tey hava meldað tað sum happing, greiðir hon frá.

## Ivast í egnari megi

Tine Maj Holm vísir á, at sleppur slíkt neiligt rák at halda fram á arbeiðsplássunum, so fer pedagogurin at ivast í egnari fakligheit. Tað snýr seg jú um fakligan stoltleika. Tú kanst eisini uppliva eina fakliga avbyrging, tí tú tekur teg aftur frá starvsfólkunum og leiðsluni. Tú hevur ikki longur hug at geva øðrum lut í tí, tú hugsar og gert, tí tú kennir tað, sum tað er tær, nakað er galið við.

– Sovorðið kann enda við sjúkramelding í styttri ella longri tíðarskeið, alt eftir hvussu leiðslan arbeiðir við málinum. Tað kann eisini enda við arbeiðsskifti, og fyri uppaftur onnur endar tað við, at tey ongantíð koma inn aftur á arbeiðsmarknaðin. Tey, sum ongantíð koma aftur á arbeiðsmarknaðin eru ofta tey, sum ferð eftir ferð hava verið fyri harðskapshóttanum, sigur hon.

## Arbeiðsgleði

Ráðgevin hjá *Socialpedagogerne* í Danmark sær tað sum aðalmálið, at pedagogar hava arbeiðsgleði, trivnað, fakligan stoltleika, og at teir eru leingi á arbeiðsmarknaðinum.

– Tá tað kemur til happing eru royndirnar,



*Fullsett var til fyrilesturin hjá gestarøðaranum, Tine Maj Holm.*
*Mynd: Grækaris D. Magnussen*

at hevur tú á einum arbeiðsplássi leiðreglur fyri happing, so er happingin undir helvtina av tí, hon er á teimum arbeiðsplássum, sum ikki hava leiðreglur, segði Tine Maj Holm millum annað í røðu sínu á Fakfagnaðinum.

Tine Maj Holm er útbúgving løgfrøðingur. Hon hevur starvast í *Arbejdsskadestyrelsen* og *Ankestyrelsen*. Síðan 2005 hevur hon verið ráðgevi hjá *Socialpædagogerne* í Danmark (SL) sum arbeiðumhvørvisráðgevi.

Hon hevur drúgvar royndir frá vitjanum á pedagogiskum arbeiðsplássum og hevur hildið framløgur um arbeiðsumhvørvi fyri álitisfólkum og leiðarum. Nú hevur hon fingið kanningina, sum Pedagogfelagið hevur latið gjørt um sálarligt arbeiðsumhvørvi. Og hetta kom hon eisini inn á í gestarøðu síni á Fakfagnaðinum á Hotel Føroyum.



*Áhugin var stórur fyri fyrilestrinum, sum millum annað snúði seg um happing á arbeiðsplássinum.*
*Mynd: Grækaris D. Magnussen*



*Hesar skipaðu fyri Fakfagnaðinum: Elin N. W. Tausen, Rikke Bak Sørensen, Fríða Lómstein og Charlotta á Váli Olsen.*
*Mynd: Grækaris D. Magnussen*

# Væl nøgdur fyriskipari

*Elin N. W. Tausen, næstforkvinna í Pedagogfelagnum og umboð hjá nevndini í Aktións- og upplýsingargrunninum hjá Føroya Pedagogfelag, var høvuðsfyriskipari á Fakfagnaðinum „Námsfrøði í verki", sum var á Hotel Føroyum hósdagin 19. mars.*

*Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS*

Hýrurin millum tey, sum vóru við í Fakfagnaðinum, var góður. Spurdi tú tey, sum høvdu skipað fyri einari verkstovu, so vóru tey væl nøgd, og tey, sum høvdu meldað seg til ymsu verkstovurnar, vóru eitt stórt smíl, tá tey vóru spurd um, hvussu teimum dámdi tiltakið.

Og eisini høvuðsfyriskiparin, Elin N.W. Tausen, var væl nøgd. Tá eg tosaði við hana, var bara eitt verkstovu-umfar eftir, og tí bar til hjá henni at taka eitt sindur samanum.

## Samskipanin

– At samskipa verkstovurnar, samskifta við øll, snøgt sagt hetta at fáa alt at hanga saman, hevur verið mest samansetta arbeiðið, heldur Elin N. W. Tausen.

Tað er at fáa ymsu verkstovurnar inn ávísa klokkutíð, at broyta hølir, at fylgja við tilmeldingum, hvørjar verkstovur flest fólk melda seg til, og so at útvega størri høli til júst ta og ta verkstovuna, tað hevur verið trupla og spennandi uppgávan í fyrireikingunum.

– Vit fóru av álvara undir fyrireikingarnar tíðliga í januar. Tað fyrsta var at gera faldaran, innbjóðingina, at fáa alt rættlisið, at samla alt tilfarið um verkstovurnar og síðan at lýsa tær, var kanska tað største arbeiðið. At fáa tað sett saman grafiskt flott og innbjóðandi, tað var nógv sovorðið, ið tók tíð. Vit høvdu ein grafikara at gera grafiska arbeiðið, sigur Elin N. W. Tausen.

Men so var eitt lítið andarhol, til tilmeldingarnar lótu aftur.

Eftir at tilmeldingin lat aftur, hevur verið samskift við verkstovuhaldararnar um, hvat teir høvdu brúk fyri til framløgurnar. Samskift hevur verið við hotellið um, hvussu nógv fólk fóru at vera í hvørjum rúmi.

– Og so hetta við at gera navnaskelti, sum ivaleyst kann gerast á nógvar flottari hættir, enn vit gjørdu. Men tíðin rann undan okkum, og ongin okkara hevur skipað fyri so stórum tiltaki áður. Men eg haldi, at tað riggaði kortini, sigur næstforkvinnan í Pedagogfelagnum.

## Riggaði væl

Hon dugir ikki rættiliga at siga, hvussu tað kennist, nú Fakfagnaðurin nærkast endanum. Vit sita í Clinton-stovuni, og hon hugsar seg eitt sindur um.

– Jú, eg haldi, at hetta hevur riggað bara væl. Okkurt smávegis vantaði í morgun, tá vit byrjaðu, men tað fingu vit upp á pláss. Onkur leitaði kanska eftir einari verkstovu, onkur annar hevði hug at skifta um. Og síðan fyrsta verkstovan fór í gongd, hevur so lítið annað verið at gjørt enn at vera tøk. Seinnapartin havi eg bara hoyrt fólk latið væl at. Tey halda tað hava koyrt væl; og rúm hevur eisini verið hjá fólki at tosa saman um tað, tey hava fingið burturúr, tí passaligir steðgir hava verið. Og tað hóskar væl til logo'ið hjá okkum, sum merkir „at geva øðrum lut í vitan".

– Logo'ið vísir okkum, at vit eru í røring, at vit koma saman at menna okkara fak, vit lyfta tað, vit fagna tað, venda og snara tí, og tað steðgar ikki, tað heldur alsamt fram, sigur Elin N. W. Tausen.

Hon fer nú at lesa eftirmetingarskjølini, væl vitandi, at øll síggja ikki tingini á sama hátt. Men mongu jaligu eftirmetingarnar frá tiltakinum taka fyrireikararnir við sær. Aftur at Elin N. W. Tausen hava hesar skipað fyri: Rikke Bak Sørensen, Charlotta á Váli Olsen og Fríða Lómstein.

Anna Dalsgaard:

# Var til verkstovuna hjá Jógvani Philbrow um gerandis námsfrøði

Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS

- Ja, Jógvan tosaði sjálvandi um gerandis námsfrøði, sum heitið á verkstovuni var. Og tað, sum eg haldi vera áhugavert, tá vit tosa um gerandis námsfrøði er hetta, at jú meira arbeiði verður lagt á okkum, meira gloyma vit sjálva ætlanina við arbeiðinum hjá okkum. Tú skalt jú alla tíðina gera ymisk ting, heldur hon.

– Og nú verður so nógv lagt út til kommunurnar, og har eru vit eftirbátur. Eg vænti, at vit koma at svíða fyri tað, t.d. nú eldraøkið er lagt út. Eisini hesum var Jógvan inni á. Tað er heilt greitt vandi fyri, at tað fer at raka okkum fíggjarliga, at fleiri øki verða løgd út til kommunurnar.

Jú, eg helt verkstovuna um gerandis námsfrøði vera áhugaverda.




*Anna Dalsgaard var m.a. til verkstovuna hjá Jógvani Philbrow.*




*Dagmar Clothier, vm., og Elin K. Jacobsen høvdu verkstovuna „Lopfjølin“*
*Mynd: Grækaris D. Magnussen*



# Væl nøgdar við sína verkstovu „Lopfjølin“

*Tær báðar, Dagmar Clothier og Elin K. Jacobsen, høvdu verkstovuna „Lopfjølin“. Og tær eru væl nøgdar.*

*Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS*

Lopfjølin er ein ætlan við einum øðrvísi skúlatilboði til ung, sum detta úr skúlaskipanin í høvuðsstaðnum.

– Tað hevur víst seg at vera ein trupulleiki, at skúlarnir í Tórshavnar kommunu hava fleiri og fleiri næmingar, sum detta úr skúlanum. Og tí er hendan ætlanin sett í verk. Endamálið er, at næmingarnir, sum ikki megna at ganga í vanliga fólkaskúlanum, eisini kunnu fáa eitt 9. floks prógv, sigur Dagmar Clothier.

– Vit halda til í hølunum hjá Margarinfabrikkini, og vit hava 20 tímar, sum vit hava fingið játtaðar frá barnaverndini. Vit eru tveir pedagogar og tveir lærarar, sum Sernám hevur fingið játtað tímar til. Lærararnir taka sær av undirvísingini, og vit pedagogar taka okkum av tí sosiala og pedagogiska partinum. Vit arbeiða saman sum eitt toymi, sigur Elin K. Jacobsen.

## Góð úrslit

Higartil hava úrslitini av Lopfjølini verið góð.

– Vit hava fingið góð úrslit, onkur hevur longu fingið 9. floksprógv. Og samstarvið millum námsfrøðingar og lærarar riggar rættiliga væl, siga tær báðar.

Hetta er so nýtt, og tí verður tað eftirmett í summar. Tá verður avgjørt, um arbeiðið skal halda fram.

– Tað, sum vit uppliva, er, at tey ungu, sum ganga á Lopfjølini, eru rættiliga glað fyri, at tað er eitt tilboð, har sum tey kenna seg møtt, bæði menniskjaliga og viðvíkjandi læring, siga tær báðar.

## Verkstovan

Dagmar Clothier og Elin K. Jacobsen halda tað vera gott at sleppa at siga øðrum, hvat tað er, sum tær arbeiða við, tí rættiliga fá kenna til Lopfjølina.

– Tað er jú nýtt, og tí var tað gott hjá okkum at sleppa at greiða øðrum frá, hvat hetta er, hvussu tað er bygt upp og so framvegis.

– Vit høvdu fyrireikað okkum væl og givið pláss fyri spurningum. Vit halda, at hetta avgjørt er nakað, sum aðrar kommunur kundu tikið til sín, siga Dagmar Clothier og Elin K. Jacobsen, pedagogar.




*43 prosent av limunum í Pedagogfelagnum hava havt illgruna um strongd hetta seinasta árið móti 32 prosentum av fólkinum sum heild.*



*Maud Wang Hansen, forkvinna í Føroya Pedagogfelag, bjóðaði vælkomin, og legði dent á, at arbeiðsgevarar hava ábyrgd av, at skapa góðar og tryggar karmar um innihaldið í námsfrøðiliga arbeiðinum.*

# Nógv strongd innan námsfrøðina

*Tey, ið starvast innan námsfrøðiliga økið, eru oftari merkt av strongd enn fólkið sum heild, og tey halda ikki, at lønin stendur mát við arbeiðsmongdina. Tað vísir ein nýggj trivnaðarkanning, men hon vísir eisini, at næstan øll, ið starvast innan námsfrøðinga í Føroyum, eru errin av sínum arbeiði.*

*Ingolf S. Olsen – PRESS*

Strongd er ikki at spæla við, og um føroysku hagtølini standa í lutfalli við tey donsku, so doyggja 14 føroyingar um árið av strongd.

Tí skal trivnaðarkanningin, sum Niclas Heri Jákupsson og hansar virki Fegin hava gjørt fyri Føroya Pedagogfelag takast í stórum álvara, sigur hann, men leggur í samstundis dent á, at ein skal vera varin við at samanbera slík tøl millum lond, tí fortreytir og kringumstøður kunnu vera so ymisk í teimum ymisku londunum.

Kanningin var løgd fram á almennum fundi, sum Pedagogfelagið skipaði fyri á Hotel Føroyum um kvøldið 19. februar, og hon vísir, at 43 prosent av limunum í felagnum – tað er 43 prosent av teimum, sum arbeiða á námsfrøðiligum arbeiðsplássum í Føroyum – hava havt illgruna um strongd seinasta árið undan, at kanningin varð gjørd. Tað eru 11 prosent fleiri enn fólkið sum heild, um samanborið verður við eina gallupkanning í fjør.

57 prosent av øllum limunum í Føroya Pedagogfelag tóku lut í kanningini við at svara spurningum umvegis teldupost.

## Tørv á læknahjálp

Tað er ikki bara talið av teimum, ið hava illgrunda um strongd, sum liggur omanfyri miðaltalið fyri allar føroyingar. Limirnir í Pedgogfelagnum vitja eisini oftari lækna, tí tey merkja strongd, og verða eisini oftari sjúkraskrivaðð vegna strongd enn føroyingar í miðal.

Kanningin vísir eisini týðuliga, at tey, ið starvast innan námsfrøðina, ikki halda seg fáa nóg mikið í løn í mun til arbeiðsmongdina og ábyrgdina, ið teimum er áløgd.

58 prosent halda, at sjálv arbeiðsbyrðan er ov stór í mun til lønina, og 57 prosent halda, at lønin ikki stendur mát við ábyrgdina.

## Strongdpolitikkur

Niclas Heri Jákupsson var undir framløguni av kanningini ikki í iva um, at strongdtølini fyri námsfrøðiligu arbeiðsplássini í Føroyum eru alt ov høg, og hann mælti í sínari niðurstøðu til, at øll arbeiðspláss fáa sær ein greiðan strongdpolitikk, ið hevur greiðar ásetingar um, hvat arbeiðsplássið skal gera fyri at fyribyrgja strongd, hvørjum mannagongdum tað fylgir, tá eitt starvsfólk verður rakt av strongd, og hvussu tað tekur ímóti starvsfólki, ið kemur aftur til arbeiðis eftir sjúkrafráveru vegna strongd.

Hóast álvarsomu strongdtølini, so eru tó eisini positiv úrslit í kanningini, sum vísa, at námsfrøðingar, hjálparfólk, leiðarar og onnur, ið starvast innan námsfrøðina, brenna fyri sínum faki, hóast løn og arbeiðsviðurskifti ikki eru nakað at reypa av.

Omanfyri 90 prosent av teimum eru nevniliga sambært kanningini errin av sínum arbeiði og siga, at tey gera eitt meiningsfult arbeiði bæði fyri seg sjálvi og tey, sum tey eru um á arbeiðsplássinum.




*Strongdtølini hjá limunum í Pedagogfelagnum eru høg og mugu takast í stórum álvara, segði Niclas Heri Jákupsson, tá hann legði trivnaðarkanningina fram.*




*Trivnaðarkanningin vísir ikki bara døpur tøl – limirnir í Pedagogfelag siga seg hava meiningsfult arbeiði, sum teir eru ernir av.*



*Trivnaðarkanningin varð løgd fram á almennum kjakfuni á Hotel Føroyum, og har var fitt av fólki.*

## Hevur tú innanfyri teir seinastu 12 mánaðirnar verið til lækna vegna illgruna um strongd?




*15 prosent av limunum í Pedagogfealgnum hava verið hjá lækna vegna illgruna um strongd móti níggju prosentum av fólkinum sum heild.*

## Starvsheiti og læknavitjan vegna illgruna um strongd




*Um sæð verður burtur frá bólkinum „annað", vísir kanningin ein eitt sindur størri tendens hjá hjálparfólki við námsfrøðiligari ábyrgd og varaleiðarum at fáa so álvarsom strongd-sjúkutekin samanborið við hini innan námsfrøðina, at tey leita sær til lækna.*

## Hevur tú innanfyri teir seinastu 12 mánaðirnar verið sjúkrameldað/ur vegna strongd?




*Sjey prosent av teimum, ið starvast á námsfrøðiligum arbeiðsplássum, hava verið sjúkrameldað vegna strongd hetta seinasta árið, og tað er meira enn tvífalt so nógv sum í fólkinum sum heild.*

## Starvsheiti og sjúkramelding vegna strongd




*Eisini tá tað kemur til regulerar sjúkrameldingar vegna strongd, tykjast hjálparfólk við námsfrøðiligari ábyrgd at verða harðari rakt, enn hinir námsfrøðiligu starvsfólkabólkarnir.*



*Danski løgfrøðingurin og arbeiðsumhvørviskonsulenturin Tine Maj Holm hevði ein fyrilestur, tá trivnaðarkanningin varð løgd fram. Hon kundi millum annað siga frá, at í donskum sáttmálunum fyri námsfrøðilig arbeiðspláss er tað ásett, at arbeiðsgevararnir regluliga skulu skipa fyri trivnaðarkanningum á arbeiðsplássunum.*



*Tað er Niclas Heri Jákupsson, sum við sínum virki Fegin, hevur ábyrgdina av kanningini, og Katrin Reinert, bachelor í sosiologi, hevur savnað inn dáturnar og viðgjørt tær.*




*Arbeiðið hevur nógv at týða fyri tey, ið starvast við námsfrøði, og ikki færri enn tilsamans 92 prosent av teimum eru annaðhvørt í stóran mun ella ávísan mun errin av sínum arbeiði.*




*Ongin ivi er um, at limirnir í Føroya Pedagogfelag generelt halda seg fáa ov lítið í løn.*




*Lønin stendur ikki mát við ábyrgdina, heldur ein stórur meiriluti av limunum í Føroya Pedagogfelag.*

# Myndir frá Fakfagnaðinum



*Dagmar Beder var ein teirra, sum skipaði fyri verkstovuni „Bindifestivalur í námsfrøðiligum ljósi“*



*Guðrun Horn og Sigrun Davidsen høvdu verkstovuna „Latið børnini spæla“*



*Gunnvá Edvardsdóttir hevði verkstovuna „Men størstur er kærleikin...“*



*Drakenfestivalurin – ein sjónleikarafestivalur fyri fólk við menningartarni: Diana Solbjerg Mouritsen hm., og Tove Hjørleifsdóttir Jacobsen*



*Ingi Hansen hevði verkstovuna „Hvat gera vit, tá vit ikki røkka inn til sárbæra varnið“*



*Niels Juel Arge hevði verkstovuna „Lat fundamentanina økja um námsfrøðiligu dygdina“*




*„Ósjónliga arbeiðið tekur tíð“ – verkstova, sum Poula Eidesgaard hevði*




*„Gerandis námsfrøði“ við Jógvan Philbrow*



*„Tá familjur brotna“ var verkstova hjá Salua Manai og Ingvør Weihe*

# LÍV Pensjón

## Ein gevandi framtíð



norna.fo 512002